# Almannamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | 21/00155- |
| Málsviðgjørt: | EM/SJH |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**foreldramyndugleika og samveru (Foreldramyndugleikalógin)**

## Kapittul 1
## Foreldramyndugleiki

*Alment*

**§ 1.** Børn undir 18 ár eru undir foreldramyndugleika, uttan so, at tey eru gift.

**§ 2.** Barnið hevur rætt til umsorgan og tryggleika. Barnið skal farast við við virðing fyri samleika sínum og skal ikki vera fyri likamligum ella sálarligum ágangi ella øðrum vanvirðandi gerðum.
*Stk. 2.* Avgerð sambært hesi løgtingslóg skal takast við atliti at barnsins besta. Myndugleikar skulu tryggja, at avgerðir viðvirka til at tryggja trivna og at verja barnið móti harðskapi ella øðrum, sum setir barnið í vanda, so sum at vera vitni til harðskap.
*Stk. 3.* Í øllum viðurskiftum um barnið skal fyrilit takast fyri sjónarmiðunum hjá barninum alt eftir aldri og búning.

**§ 3.** Tann, sum hevur foreldramyndugleikan, skal hava umsorgan fyri barninum og kann taka avgerðir um persónligu viðurskiftini hjá barninum í samsvari við áhugamál og tørvin hjá barninum.
*Stk. 2.* Hava foreldur felags foreldramyndugleika, skulu tey vera samd um týðandi avgerðir viðvíkjandi barninum. Tað av foreldrunum, sum barnið býr hjá, avger sjálvt yvirskipaði viðurskifti í gerandisdegnum hjá barninum, so sum hvar í landinum barnið skal búgva.
*Stk. 3.* Hava foreldur felags foreldramyndugleika, og eru tey ósamd um, hvør teirra skal hava foreldramyndugleikan einsamalt, skulu bæði geva samtykki til, at barnið fer av landinum.

**§ 4.** Tann, sum hevur foreldramyndugleikan, kann í hóskandi mun nýta inntøkur hjá barninum til at

uppihalda barninum við atliti at egnari og barnsins støðu.

**§ 5.** Er foreldur dømt treytaleysa fongsulsrevsing ella dømt til varðhald (anbringelse) sbrt. § 68, 2. pkt í revsilógini., ella § 69 í revsilógini, ella til trygdarvarðhald (forvaring) sbrt. § 70 í revsilógini fyri brot á §§ 114-114 h, § 136, stk. 2 í revsilógini viðvíkjandi samtykki til gerðir, fevndar av § 114-114 h, § 210, kapittul 24 burtursæð frá § 228 ella §§ 237, 245, 245 a, 246 ella 262 a, kann tað ikki, uttan so, at tað er best fyri barnið, verða tikin avgerð um:

1) At foreldrið hevur foreldramyndugleikan ella lut í foreldramyndugleikanum yvir barninum sbrt. § 11, § 13, stk. 2, § 14, § 15, stk. 2 ella 3, ella §§ 30-32.
2) At barnið býr hjá foreldrinum, sbrt. § 17, stk. 1, ella § 30.
3) At barnið hevur samveru ella annað samband við foreldrið, sbrt. §§ 21, 22, 23 ella 33.

*Tann, sum hevur foreldramyndugleikan*

**§ 6.** Eru foreldur gift, tá ið barnið verður føtt, ella giftast tey seinni, hava tey foreldramyndugleikan í felag.
*Stk. 2.* Eru foreldrini sundurlisin, tá ið barnið verður føtt, hevur mamman foreldramyndugleikan einsamøll, uttan so, at samlívið millum hjúnafelagarnar verður uppafturtikið, ella foreldrini hava gjørt avtalu um felags foreldramyndugleika sbrt. § 9.
*Stk. 3.* Vóru foreldur sundurlisin ella fráskild, 10 mánaðir áðrenn barnið varð føtt, hava tey tó foreldramynduleikan í felag.

**§ 7.** Eru foreldur ikki gift, hevur mamman foreldramyndugleikan einsamøll, uttan so, at foreldrini hava gjørt avtalu um felags foreldramyndugleika sbrt. § 9.
*Stk. 2.* Er ein maður at rokna sum pápi at barninum sambært váttan ella dómi um faðirskap, hava foreldrini felags foreldramyndugleika, um tey hava havt felags bústað sambært landsfólkayvirlitinum seinastu 10 mánaðirnar, áðrenn barnið varð føtt.

**§ 8.** Foreldur, ið saman hava ættleitt eitt barn, hava felags foreldramyndugleika.
*Stk. 2.* Um ein einligur hevur ættleitt eitt barna, hevur viðkomandi foreldramyndugleikan einsamallur, sbr. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Foreldur hava foreldramyndugleikan í felag, tá ið annað av foreldrunum hevur ættleitt barnið hjá hinum sambært § 6, stk. 1 í ættleiðingarlógini.

*Avtala um felags foreldramyndugleika*

**§ 9.** Foreldur kunnu avtala felags foreldramyndugleika. Avtalan fær virknað, tá hon er fráboðað Familjufyrisitingini. Er eitt mál um foreldramyndugleika lagt fyri rættin, kann fráboðanin latast rættinum.
*Stk. 2.* Ein avtala sbrt. stk. 1 er ikki galdandi, um hon er gjørd, áðrenn barnið er føtt, ella um avtalan er treytað ella tíðaravmarkað.

*Samlívsslit*

**§ 10.** Felags foreldramyndugleiki heldur fram, hóast foreldrini slíta samlívið, verða sundurlisin ella skild, ella hjúnabandið verður ógildað.
*Stk. 2.* Liva foreldrini ikki saman, ella ætlar ein teirra at slíta samlívið, kann hvør teirra krevja, at felags foreldramyndugleikin skal steðga.

*Uppathald av felags foreldramyndugleika*

**§ 11.** Skal felags foreldramyndugleiki halda uppat, kunnu foreldrini avtala, hvør teirra skal hava foreldramyndugleikan einsamallur. Avtalan fær virknað, tá hon er fráboðað Familjufyrisitingini. Er eitt mál um foreldramyndugleika lagt fyri rættin, kann fráboðanin latast rættinum.

*Stk. 2.* Eru foreldrini ósamd, tekur Familjufyrisitingin við atliti at barnsins besta avgerð um, hvørt felags foreldramyndugleiki skal halda fram, ella hvør teirra skal hava foreldramyndugleikan einsamallur.
*Stk. 3.* Familjufyrisitingin kann ikki taka avgerð um felags foreldramyndugleika, um bæði foreldrini eru ímóti hesum.

*Uppafturtøka av samlívi*

**§ 12.** Eru foreldrini gift ella sundurlisin, fáa tey aftur felags foreldramyndugleika, um tey taka upp aftur ella halda fram við samlívinum, hóast avtala er gjørd, ella avgerð er tikin um, at annað av foreldrunum skal hava foreldramyndugleika einsamalt. Eru foreldrini ógift ella fráskild, fáa tey ikki felags foreldramyndugleika, uttan so, at tey avtala tað, sbrt. § 9.

*Flyting av foreldramyndugleika*

**§ 13.** Foreldramyndugleikin kann sambært avtalu, ið er góðkend av Familjufyrisitingini, flytast frá einum av foreldrunum til hin. Er eitt mál um foreldramyndugleika lagt fyri rættin, kann avtalan góðkennast av rættinum.
*Stk. 2.* Foreldramyndugleikin kann sambært avtalu, ið er góðkend av Familjufyrisitingini, flytast til onnur enn annað av foreldrunum. Foreldramyndugleikin kann flytast til eini hjún ella eitt samlivandi par, íroknað annað av foreldrunum og hjúnafelagan ella samlivan hjá viðkomandi. Avtalan verður góðkend, uttan so, at hon er í ósamsvari við, hvat tænir barninum best. Er eitt mál um foreldramyndugleika lagt fyri rættin, kann avtalan góðkennast av rættinum.
*Stk. 3.* Ein avtala sbrt. stk. 1 og 2 er ikki galdandi, um hon er gjørd, áðrenn barnið er føtt, ella um avtalan er treytað ella tíðaravmarkað. Harafturat er ein avtala sbrt. stk. 2 ikki galdandi, um foreldramyndugleikahavin fær samsýning ella gjald fyri mista arbeiðsinntøku

**§ 14.** Familjufyrisitingin kann eftir áheitan frá einum av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, taka avgerð um, at foreldrini skulu hava felags foreldramyndugleika, ella at foreldramyndugleikin verður fluttur til viðkomandi.

*Andlát*

**§ 15.** Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, og annað teirra doyr, hevur eftirsitandi einsamallur foreldramyndugleikan.
*Stk. 2.* Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, og annað teirra doyr, kunnu onnur, sum barnið er knýtt at, søkja um at fáa foreldramyndugleikan, um barnið ikki búði hjá eftirsitandi foreldrinum.
*Stk. 3.* Doyr tann av foreldrunum, sum einsamallur hevur foreldramyndugleikan, tekur Familjufyrisitingin avgerð um, hvør skal hava foreldramyndugleikan. Eftirsitandi og onnur, sum barnið er knýtt at, kunnu søkja um at fáa foreldramyndugleikan.
*Stk. 4.* Er annað av foreldrunum atvoldin til, at hin doyr, kunnu onnur søkja um at fáa foreldramyndugleikan. Umsóknin kann bara verða gingin á møti, um tað er av avgerandi týdningi við fyriliti fyri barnið, at foreldramyndugleikin ikki verður verandi hjá eftirsitandi.
*Stk. 5.* Foreldramyndugleikin kann flytast til eini hjún ella eitt samlivandi par, íroknað annað av foreldrunum og hjúnafelagan ella samlivan hjá viðkomandi.

**§ 16.** Ein avgerð sambært § 13, stk. 2 og ein avgerð sambært § 15 kann broytast.

**§ 17.** Tann, sum hevur foreldramyndugleikan, kann boða frá, hvør skal hava foreldramyndugleikan eftir deyða. Fráboðanin verður fylgd, uttan so, at fyrilit fyri barnsins besta tala ímóti tí.

Framíhjárætturin hjá eftirsitandi sbrt. § 15 er tó galdandi, hóast fráboðanina.

## Kapittul 2
## Bústaður og fráboðan

**§ 18.** Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, og eru tey ósamd um hjá hvørjum teirra, barnið skal búgva, tekur Familjufyrisitingin avgerð um tað. Familjufyrisitingin kann taka avgerð um, at barnið kann búgva hjá einum av foreldrunum, sum býr ella fer at búgva uttanlands.
*Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann broyta eina avtalu ella eina avgerð um bústaðin hjá barninum.

**§ 19.** Tann av foreldrunum, sum ynskir at flyta ella at flyta við barninum, tað veri seg bæði innanlands og uttanlands, skal boða hinum frá hesum í seinasta lagi 6 vikur áðrenn flytingina.

## Kapittul 3
## Samvera

**§ 20.** Barnsins samband við bæði foreldur skal so vítt gjørligt varðveitast, soleiðis at barnið hevur rætt til samveru við tann av foreldrunum, sum ikki hevur barnið búgvandi.
*Stk. 2.* Foreldrini skulu í felag tryggja, at barnið hevur samveru við tann av foreldrunum, ið barnið ikki býr hjá. Tað sama er galdandi við ferðing og ferðaútreiðslum í sambandi við samveruna.
*Stk. 3.* Tann av foreldrunum, sum barnið ikki býr hjá, kann søkja um samveru.
*Stk. 4.* Tann av foreldrunum, sum barnið býr hjá, kann biðja Familjufyrisitingina um at áseta samveru. Familjufyrisitingin kann bara áseta samveru um samveruforeldrið ynskir hetta.

**§ 21.** Familjufyrisitingin tekur eftir umbøn avgerð um vavið og útinnan av samveruni og kann áseta neyðugar treytir í tí sambandi. Avgerðin skal takast við atliti at barnsins besta.
*Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann broyta eina avtalu ella avgerð um samveru, um mett verður, at broytingin er best fyri barnið, serliga tá talan er um týðandi broytingar í umstøðunum.
*Stk. 3.* Familjufyrisitingin kann nokta at áseta samveru ella strika eina avtalu ella avgerð um samveru, um hetta er neyðugt við atliti at barnsins besta.

*Samvera við onnur enn foreldur*

**§ 22.** Um annað ella bæði foreldur eru deyð, ella annað av foreldrunum er ókent, kann Familjufyrisitingin áseta samveru við onnur enn foreldur, sum barnið er knýtt at.
*Stk. 2.* Hevur barnið sjáldan samveru við foreldrið, ið tað ikki býr hjá, kann Familjufyrisitingin, eftir áheitan, áseta samveru við onnur, sum barnið er knýtt at.

**§ 23.** Er barnið ættleitt, kann Familjufyrisitingin eftir umbøn áseta samveru ella annað samband við uppruna skyldfólk, um barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við tann, sum søkir um samveru v.m.

*Viðbótarsamvera*

**§ 24.** Um avtalað ella ásett samvera ikki verður hildin, verður samvera í vikuni eftir undir somu treytum, sum samvera annars varð avtalað ella ásett, sambært tó stk. 2 og 3. Viðbótarsamvera sambært 1. pkt. er treytað av:
1) at tað ikki er orsakað av viðurskiftum hjá samveruforeldrinum, at avtalaða ella ásetta samveran ikki verður framd, og
2) at samveruforeldrið beinanvegin eftir, at samveran ikki verður hildin, gevur bústaðarforeldrinum boð um, at viðkomandi vil hava viðbótarsamveru.

*Stk. 2.* Stk. 1 fevnir ikki um samveru í feriu ella halgidøgum, samveru undir eftirliti og samveru, sum sambært avtalu ella avgerð skal vera hildin ávísa tíð, sum ikki fylgir av einari nærri fastlagdari ætlan.
*Stk. 3.* Viðbótarsamvera verður ikki ásett tá:

1) samveran fellur heilt ella partvíst saman við ásettari ella avtalaðari samveru, ella
2) samveran fellur heilt ella partvíst saman við feriu ella halgidøgum, har barnið sambært avgerð ella avtalu skal vera hjá bústaðarforeldrinum.

*Stk. 4.* Stk. 1-3 er somuleiðis galdandi, tá ið viðbótarsamvera sambært stk. 1 ikki verður framd.

*Stk. 5.* Avgerðir um samveru skulu hava eina áseting um viðbótarsamveru. Familjufyrisitingin skal vegleiða foreldrum, sum gera avtalu um samveru, um viðbótarsamveru.

*Annað samband*

**§ 25.** Familjufyrisitingin kann í serligum førum taka avgerð um, at tann av foreldrunum, sum ikki hevur barnið búgvandi, kann hava samband við barnið umvegis telefon, bræv ella aðrar samskiftismiðlar.

*Stk. 2.* Umbøn um annað samband kann berast fram av:
1) tí av foreldrunum, sum ikki hevur barnið búgvandi, og
2) barnsins næstum, um ásetingarnar í § 21 um samveru eru loknar.

*Kunning um barnið*

**§ 26.** Tann av foreldrunum, ið ikki hevur foreldramyndugleika, hevur rætt til kunning um viðurskifti um barnið frá skúla, dagstovni, dagrøkt, almannaverki, heilsuverki, kommunulækna og tannlækna. Viðkomandi hevur eisini rætt til at fáa handað skjøl um viðurskifti um barnið, um hesi eru til skjals á skúla ella stovni.

*Stk. 2.* Myndugleikin, stovnurin, læknin ella tannlæknin kunnu nokta at útflýggja upplýsingar, um hetta skaðar barnið. Upplýsingar um tann av foreldrunum, sum hevur foreldramyndugleikan, umframt tess samband við barnið, skulu ikki útflýggjast.

*Stk. 3.* Familjufyrisitingin kann í serligum førum, og eftir umbøn frá tí, sum hevur foreldramyndugleika, ella einum av teimum í stk. 1 nevndu myndugleikum, nokta rætt til kunning eftir stk. 1 og 2. Avgerðin hevur virknað frá tí, at myndugleikin fær fráboðan um avgerðina.

*Umsorganaryvirtikin børn*

**§ 27.** Ásetingarnar í hesi lóg viðvíkjandi samveru og øðrum sambandi eru ikki galdandi, um barnið er umsorganaryvirtikið sambært kapitli 4 í barnaverndarlógini.

*Avgerðir í sambandi við ferðing uttanlands*

**§ 28.** Hava foreldrini felags foreldramyndugleika og eru ósamd um foreldramyndugleikan, kann Familjufyrisitingin taka avgerð um, at annað av foreldrunum kann ferðast við barninum uttanlands í eitt stutt tíðarskeið.

*Ferðing og ferðaútreiðslur*

**§ 29.** Bæði foreldur skulu tryggja, at samvera kann fremjast. Ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru innanlands og uttanlands skulu sum meginregla deilast millum foreldrini.

Stk. 2. Eru foreldrini ósamd um ferðing og ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, kann Familjufyrisitingin í heilt serligum føri taka avgerð um býti av ferðaútreiðslunum.

## Kapittul 4
## Arbeiðsavtalur

**§ 30.** Hevur eitt barn við loyvi frá tí, ið hevur foreldramyndugleika, átikið sær arbeiði, har barnið fær møguleika at uppihalda sær sjálvum, kann barn, ið er fylt 15 ár, slíta avtaluna og átaka sær arbeiði av líknandi slagi, uttan so, at tann, ið hevur foreldamyndugleika, tekur aðra avgerð.

**§ 31.** Hevur barnið av sínum eintingum átikið sær arbeiði, kann tann, sum hevur foreldramyndugleika, slíta avtaluna, um atlit at uppaling og vælferð tala fyri tí.

Hetta skal tó gerast við hóskandi varningi, og um tað verður mett rímiligt, kann hin parturin fáa endurgjald.

## Kapittul 5
## Fyribils avgerðir

*Foreldramyndugleiki, bústaður og samvera*

**§ 32.** Í einum máli um foreldramyndugleika kann tann myndugleikin, sum viðger málið, eftir áheitan taka avgerð um, hvør av foreldrunum fyribils skal hava foreldramyndugleikan, ella hjá hvørjum av foreldrunum barnið fyribils skal búgva.
*Stk. 2.* Í einum máli um bústaðin hjá barninum kann avgerð eftir áheitan verða tikin um, hjá hvørjum av foreldrunum barnið skal búgva.
*Stk.3.* Ein avgerð sbrt. stk. 1 er galdandi, til ein endalig avgerð, sum kann fullgerast, fyriliggur.
*Stk. 4.* Ein avgerð sbrt. stk. 1 dettur burtur, um áheitanin um, at ein avgerð verður tikin um foreldramyndugleika ella bústaðin hjá barninum, verður tikin aftur ella avvíst, ella um foreldrini taka uppaftur samlívið.

**§ 33.** Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, og vandi er fyri, at annað av foreldrunum tekur barnið við sær av landinum undan eini avgerð um foreldramyndugleika, kann landsstýrismaðurin, Familjufyrisitingin ella tann, sum verður heimilaður til tað, fyribils leggja foreldramyndugleikan til hin av foreldrunum einsamallan.
*Stk. 2.* Ein avgerð sbrt. stk. 1 er galdandi, til ein endalig avtala ella avgerð um foreldramyndugleika, sum kann fullgerast, fyriliggur, sbrt. tó stk. 3.
*Stk. 3.* Ein avgerð sbrt. stk. 1, har annað av foreldrunum einsamallur fær foreldramyndugleikan, dettur burtur

1) 4 vikur eftir, at avgerðin er tikin, uttan so at áheitan um avgerð um foreldramyndugleika longu er latin Familjufyrisitingini,
2) um eitt mál fevnt av stk. 1 verður afturtikið ella verður avvíst, ella
3) um foreldrini taka upp aftur samlívið.

*Forðing*

**§ 34.** Familjufyrisitingin kann taka avgerð um, hvør skal hava foreldramyndugleikan, so leingi ein forðing elvir til, at tann, sum hevur foreldramyndugleikan, tann eini av teimum, sum hevur foreldramyndugleikan í felag ella bæði, sum hava foreldramyndugleikan í felag, ikki kunnu taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum.

*Samvera*

**§ 35.** Undir einum máli um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru ella um annað samband kann Familjufyrisitingin eftir áheitan taka avgerð um fyribils samveru. Avgerðin verður tikin við atliti at barnsins besta.
*Stk. 2.* Ein avgerð sbrt. stk. 1 undir einum máli um samveru er galdandi, til ein endalig avgerð um samveru, sum kann fullgerast, ella ein avgerð ella avtala um annað samband fyriliggur.
*Stk. 3.* Ein avgerð sambært stk. 1 dettur burtur, um umbøn um, at tað skal takast ein avgerð um foreldramyndugleika ella samveru, verður afturkallað ella avvíst, ella um foreldrini koma saman aftur.

*Broyting*

**§ 36.** Familjufyrisitingin kann broyta eina fyribils avgerð sbrt. §§ 30-34, um tað er best fyri barnið. Er mál lagt fyri rættin, tekur rætturin avgerð um foreldramyndugleikan.

## Kapittul 6
## Barnaserkøn ráðgeving og mekling

**§ 37.** Familjufyrisitingin skal bjóða foreldrum og børnum barnaserkøna ráðgeving og mekling, um ósemja er um

foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru.
*Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann í øðrum førum bjóða foreldrum, børnum og øðrum, sum barnið er knýtt at, barnaserkøna ráðgeving og mekling, um mett verður, at serligur tøvur er á tí.
*Stk. 3.* Familjufyrisitingin kann lata vera við at bjóða foreldrum, børnum og øðrum, sum barnið er knýtt at, barnaserkøna ráðgeving og mekling sambært stk. 1, um mett verður, at tað er óneyðugt ella óhóskandi.

## Kapittul 7
## Málsviðgerðarreglur

**§ 38.** Umbøn um avgerð um foreldramyndugleika sambært §§ 12, 14 og 15 um bústaðin hjá barninum sambært § 18 og um samveru sambært §§ 20-22 verður latin Familjufyrisitingini.
*Stk. 2.* Í sambandi við eina umbøn um avgerð sambært stk. 1, kallar Familjufyrisitingin foreldrini á fund, uttan so, at umbønin bara snýr seg um avgerð um annað samband, sambært § 24. Familjufyrisitingin kann lata vera við at kalla foreldrini á fund, um mett verður at tað er óneyðugt ella óhóskandi.
*Stk. 3.* Foreldrini hava skyldu til at luttaka á fundi, uttan so, at serligar umstøður gera seg galdandi.

**§ 39.** Barnið skal takast við í viðgerðini av einum máli um foreldramyndugleika, bústað ella samveru, soleiðis at áskoðan og sjónarmið hjá barninum koma til sjóndar. Hetta kann verða gjørt við samrøðum við barnið, barnaserkønari kanning ella á annan hátt, sum lýsir sjónarmiðið hjá barninum.
*Stk. 2.* Skyldan til at taka barnið beinleiðis við upp í málið er ikki galdandi, um mett verður, at hon er barninum til bága ella uttan týdning fyri málið.

**§ 40.** Eitt barn, sum hevur fylt 10 ár, kann heita á Familjufyrisitingina um at kalla foreldrini á fund um foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum ella samveru.

*Barnaserkøn kanning og ummæli frá serkønum*

**§ 41.** Familjufyrisitingin kann seta í verk barnaserkøna kanning og biðja um ummæli frá serkønum um foreldrini í málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru.
*Stk. 2.* Hevur Familjufyrisitingin sett eina barnaserkøna kanning í verk ella biðið um ummæli frá serkønum um annað av foreldrunum, verður kanningin ella ummælið gjørd liðug, sjálvt um málið verður lagt fyri rættin.

**§ 42.** Familjufyrisitingin skal biðja um eina váttan frá tí av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, áðrenn avgerð verður tikin sbrt. § 13 ella § 15, stk. 2, uttan so at hetta má metast at vera til munandi skaða ella ampa fyri barnið ella seinka málinum óneyðuga nógv.

**§ 43.** Familjufyrisitingin kann í sambandi við viðgerð av málum sbrt. § 28 heinta inn upplýsingar um fíggjarstøðu hjá foreldrunum og upplýsingar annars, sum eru neyðugar fyri viðgerðina av málinum.

**§ 44.** Ein umsókn um at broyta foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum, samveru ella annað samband við barnið kann verða avvíst, um umstøðurnar ikki eru broyttar munandi. Hetta er tó ikki galdandi fyri umsókn um at broyta foreldramyndugleikan sbrt. § 14, stk. 2.

*Kæra*

**§ 45.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju og heilsumálum í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.

**§ 46.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, hvussu mál skulu viðgerast sambært hesari løgtingslóg, íroknað

1) viðgerð av málum um foreldramyndugleika, so sum fráboðan av avtalum um foreldramyndugleika
2) viðgerð av málum um bústaðin hjá barninum,
3) viðgerð av málum um samveru, so sum samveru undir eftirliti og viðbótarsamveru,
4) viðgerð av málum um annað samband,
5) viðgerð av málum um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru,
6) barnaserkøna ráðgeving, barnaserkøna kanning og mekling, og
7) viðgerð av kærum.

**Kapittul 8**
**Altjóða sáttmálar**

**§ 47.** Landsstýrismaðurin kann gera sáttmálar við onnur lond um viðurskiftini millum føroyskar og fremmandar rættarreglur um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru og annað samband. Sáttmálin er galdandi í Føroyum eftir at vera kunngjørdur í Kunngerðarblaðnum.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um viðurskiftini millum føroyskar og aðrar norðurlendskar rættarreglur um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru og annað samband.

**Kapittul 9**
**Gildiskoma**

**§ 48.** Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022, og samstundis fer úr gildi anordning nr. 228 af 15. marts 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 30. apríl 2018.
*Stk. 2.* § 7, stk. 2 er bara galdandi fyri børn, sum verða fødd 1. januar 2022 ella seinni.
*Stk. 3.* Mál, ið eru byrjað áðrenn gildiskomu lógarinnar, verða viðgjørd sambært higartil galdandi reglum.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Í samgonguskjalinum frá september 2019 er ásett, at foreldramyndugleikalógin skal endurskoðast, soleiðis at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa, og rættindi og skyldur verða staðfest.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Reglur um foreldramyndugleika og samveru eru ásettar í anordning nr. 228 af 15. marts 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 30. apríl 2018 (foreldramyndugleikalógin).

***Foreldramyndugleiki***

*Rættindi og skyldur*

Børn og ung, yngri enn 18 ár, eru undir foreldramyndugleika uttan so, at tey eru gift.

Tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir einum barni, skal veita umsorgan og taka avgerðir um persónlig viðurskifti hjá barninum. Er talan um felags foreldramyndugleika, skulu foreldrini vera samd um týðandi avgerðir. Týðandi avgerðir eru t.d. val av skúla, pass, týðandi læknalig viðgerð, flyting uttanlands, tó ikki flyting við barninum innanlands ella í Ríkisfelagsskapinum, val av frítíðarskúla, vandamikið frítíðarítriv, navnaval, trúarviðurskifti og hjúnaband.

Tann, sum hevur barnið búgvandi, kann taka avgerð um yvirskipað viðurskifti í dagliga lívinum hjá barninum, eitt nú hvar í landinum (ríkinum) barnið skal búgva, hvønn dagstovn barnið skal ganga á, barnaserkøna ráðgeving og skúlasálarfrøðing. Bústaðarforeldrið kann einsamalt taka avgerðir um beinleiðis dagliga umsorgan, tá ið barnið er hjá bústaðarforeldrinum.

Samveruforeldrið kann einsamalt taka avgerðir, sum eru tengdar at samveru, so sum beinleiðis umsorgan, songartíð, frítíðarítriv v.m.

Tann av foreldrunum, ið ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, hevur sum meginregla rætt til kunning um barnið frá skúla, dagstovni íroknað privatum, kommunalari dagrøkt, almennum myndugleikum og heilsuverkinum íroknað privat sjúkrahús og privat virkandi læknum og tannlæknum. Kunningin fevnir eisini um upplýsingar um yvirskipað sosialt virksemi.

Tað av foreldrunum, sum ikki hevur foreldramyndugleika, kann ikki krevja at sleppa við til foreldrafundir, foreldrasamrøður, tiltøk á stovni v.m.

Dagstovnar ella skúlar kunnu tó heita á bæði foreldrini um at luttaka í t.d. foreldrasamrøðum, um tað verður mett at vera tað besta fyri barnið.

Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, hava tey bæði rætt til t.d. at luttaka í tiltøkum í dagstovni ella skúla, foreldrafundum, vera við til samrøður um barnið v.m., at hava samband við lækna, sjúkrahús, sosialar myndugleikar og barnavernd, og at fáa innlit í øll skjøl ella upplýsingar viðvíkjandi barninum – men ikki upplýsingar um hin av foreldrunum.

*Hvør hevur foreldramyndugleikan*

Foreldur hava felags foreldramyndugleika, tá ið foreldur eru gift við hvørjum øðrum, tá ið barnið verður føtt, ella gerast hjún seinni. Foreldur hava somuleiðis felags foreldramyndugleika, um tey eru sundurlisin, tá ið barnið verður føtt, men síðani flyta saman aftur.

Eru foreldrini ikki gift, tá ið barnið verður føtt, hevur mamman foreldramyndugleikan einsamøll. Ógift foreldur kunnu avtala felags foreldramyndugleika, og at foreldramyndugleikin verður fluttur frá øðrum av foreldrunum til hin. Avtala um foreldramyndugleika er bara galdandi, tá hon er fráboðað Familjufyrisitingini á einum serligum oyðublaði.

Felags foreldramyndugleiki heldur fram, hóast foreldur flyta hvør til sítt, verða sundurlisin ella skild.

*Ósemja um foreldramyndugleika*

Um foreldrini fara hvør frá øðrum, uttan mun til um tey eru gift ella ikki, og tey ikki verða samd um, hvør teirra skal hava foreldramyndugleikan, skal Familjufyrisitingin bjóða foreldrum og børnum barnaserkøna ráðgeving ella mekling, soleiðis at foreldrini sjálvi kunnu finna fram til eina loysn.

Eru tey framvegis ikki samd, kann málið leggjast fyri rættin, og rætturin tekur tá avgerð um, hvør teirra skal hava foreldramyndugleikan út frá tí, sum er best fyri barnið. Rætturin hevur ikki heimild at døma felags foreldramyndugleika.

*Fyribils avgerð og vandi fyri burturflyting*

Familjufyrisitingin kann taka fyribils avgerð um foreldramyndugleika í sambandi við vanda fyri burturflyting, forðing og við deyða. Í øðrum málum er tað rætturin, ið kann viðgera málið.

Um rættarmál um foreldramyndugleika er til viðgerðar, ella um tann, sum hevur foreldramyndugleikan ikki kann útinna sínar skyldur og rættindi, kann Familjufyrisitingin taka fyribils avgerð um foreldramyndugleika. Avgerðin er galdandi, til dómur fellur í málinum.

Familjufyrisitingin kann eftir umbøn fyribils lata einum av foreldrunum einsamøllum foreldamyndugleikan, um tað er felags foreldramyndugleiki, og tað er vandi fyri, at hin av foreldrunum fer at taka barnið við sær úr landinum undan einari avgerð um foreldramyndugleika. Landið verður í hesum sambandi tulkað sum ríkið.

Talan skal vera um mál, har fráferð hjá barninum er nær við. Avgerðin skal altíð vera grundað á eina ítøkiliga meting av, hvat er best fyri barnið.

Tað er ein treyt fyri at nýta heimildina, at vandin fyri, at barnið verður tikið úr landinum, er ítøkligur og bráðfeingis. Landið verður í hesum sambandi tulkað sum ríkið. Talan kann t.d. vera um, at annað av foreldrunum er horvið saman við barninum, og at ábending er um, at viðkomandi ætlar at ferðast út úr ríkinum við barninum.

Familjufyrisitingin kann taka avgerð um, hvør skal hava foreldramyndugleikan, so leingi ein forðing elvir til, at tann, tey ella annar teirra, ið hevur foreldramyndugleikan, ikki kann taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum.

Tað er ein fortreyt, at tann ið hevur foreldramyndugleikan er forðaður at útinna sínar skyldur og rættindi sum foreldramyndugleikahavi.

Hetta kann t.d. vera galdandi, um viðkomandi, orsakað av sálarligari ella likamligari sjúku, ikki er førur fyri at taka støðu til spurningar um viðurskifti hjá barninum.

Vanliga er gjørligt at fáa samband við foreldramyndugleikahavan, hóast hesin er uttanlands í óavmarkaða tíð. Uppihald í útlondum, t.v.s. uttan fyri ríkið, kann tískil bert metast at vera ein forðing, um nágreiniliga uppihaldsstaðið er ókent, ella tað av øðrum orsøkum ikki er gjørligt at fáa samband við foreldramyndugleikahavan.

Hvørki kunngerðin ella viðmerkingarnar nevna, hvussu leingi ein forðing skal vara, fyri at ein fyribils avgerð um foreldramyndugleika kann verða tikin.

Sjálvt sera stuttar forðingar kunnu sostatt gerast grundarlag fyri avgerð, um tað er bráðfeingis tørvur á at taka eina avgerð viðvíkjandi barninum.

Sum dømi um langtíðar ella varandi forðing kunnu nevnast støður, har foreldramyndugleikahavin, orsakað av t.d. varandi sjúku, ikki er før/ur fyri at taka støðu til spurningar viðvíkjandi viðurskiftum hjá barninum.

Sjálvt um foreldramyndugleikahavin er forðaður, skal ein ítøkilig meting gerast í hvørjum einstøkum føri. Tá henda meting verður gjørd, verður atlit tikið at, í hvønn mun tørvurin á at tilnevna ein fyribils foreldramyndugleikahava er ítøkligur og átrokandi, eins og dentur verður lagdur á, hvussu drúgv forðingin verður mett at vara. Tað er tískil ikki eitt krav, at ein fyribils foreldramyndugleikahavi altíð skal tilnevnast.

Ein avgerð um fyribils foreldramyndugleika er galdandi so leingi, sum forðingin er til staðar (ella til barnið ikki longur er undir foreldramyndugleika hjá viðkomandi).

Familjufyrisitingin hevur ikki heimild at áseta treytir um tíðaravmarking í avgerðum um foreldramyndugleika. Familjufyrisitingin hevur heldur ikki heimild at áseta treytir fyri fyribils foreldramyndugleika ella á annan hátt gera inntriv ella avmarkingar viðvíkjandi hesum.

*Andlát*

Er talan um felags foreldramyndugleika, og annað av foreldrunum doyr, verður foreldramyndugleikin verandi hjá viðkomandi, ið enn er á lívi. Um annað av foreldrunum hevur foreldramyndugleikan einsamalt, og viðkomandi doyr, hevur hin, ið enn er á lívi, framíhjárætt at fáa foreldramyndugleikan. Hetta er galdandi, hóast tann, sum hevur foreldramyndugleikan einsamallur, ger eitt sokallað barnatestamenti, har viðkomandi ger greitt, hvør eigur at fáa foreldramyndugleikan.

***Bústaðurin hjá barninum***

*Felags foreldramyndugleiki*

Um foreldrini hava felags foreldramyndugleika yvir barninum, og annað av foreldrunum velur at flyta frá felags heiminum saman við barninum til eitt annað stað í landinum (ríkinum), kann viðkomandi frítt gera hetta, tí hvørgin av foreldrunum hevur nakran framíhjárætt. Annað av foreldrunum kann tískil taka barnið úr felags heiminum og hava barnið hjá sær, hóast foreldrini sum meginregla skulu vera samd.

At foreldur hava felags foreldramyndugleika merkir ikki, at foreldur skulu vera samd í øllum viðurskiftum viðvíkjandi barninum. Felags foreldramyndugleiki krevur tó, at foreldur eru samd um týðandi avgerðir. Tann av foreldrunum, sum barnið er skrásett at búgva hjá, kann taka avgerð um yvirskipaði viðurskifti í gerandisdegnum, so sum hvar í danska ríkinum barnið skal búgva.

Sambært lóg um fólkayvirlit skal barnið búgva á tí bústaði, har barnið veruliga er búsitandi. Hevur tann av foreldrunum, sum ikki flytur við, givið samtykki til, at barnið flytur úr felagsheiminum, kann bústaðaforeldrið eftir hesa fyrstu flytingina úr felagsheiminum gera av, hvar í danska ríkinum barnið skal búgva. Hava foreldur felags foreldramyndugleika, og gerast foreldur ikki samd um, hjá hvørjum barnið skal hava skrásettan bústað, má mál um foreldramyndugleika leggjast fyri rættin.

Tó er galdandi sambært serlóggávuni, at ein formlig bústaðarbroyting krevur samtykki frá báðum foreldramyndugleikahavunum í sambandi við flyting frá felags heiminum. Kommunan, sum viðkomandi flytur til saman við barninum, skal syrgja fyri at heinta inn samtykki frá hinum av foreldrunum, áðrenn ein bústaðarflyting kann verða skrásett.

Um foreldrini hava felags foreldramyndugleika, og tey ikki kunnu gerast samd um, hvørjum barnið skal búgva hjá, kann spurningurin bert verða avgjørdur við, at rætturin tekur avgerð um, at felags foreldramyndugleikin verður avtikin og latin øðrum av foreldrunum.

Hvørki Familjufyrisitingin ella Føroya rættur hava heimild til serstakt at taka avgerð um bústaðin hjá barninum.

Eitt bústaðarforeldur kann í sambandi við eftirfylgjandi flyting broyta bústaðin hjá sær ella barninum til eitt annað stað í landinum (ríkinum) ella uttanlands.

Tó krevst, at bæði foreldur geva samtykki til, at barnið flytur av landinum (ríkinum), um foreldrini ikki eru samd um foreldramyndugleikan (§ 3). Við ósemju skal verða staðfest, at foreldrini eru ósamd um, hvør av teimum skal hava foreldramyndugleikan einsamallur. Ósemjan kann t.d. verða staðfest við, at mál er lagt fyri rættin ella er ávegis, ella at barnið er tikið frá tí eina av foreldrunum.

*Eina foreldramyndugleiki*

Um annað av foreldrunum hevur foreldramyndugleikan einsamallur yvir barninum, ger hesin av, hvar barnið skal búgva. Tað er eisini galdandi við flyting uttanlands, sum í hesum sambandi verður tulkað sum uttan fyri ríkið.

Sambært serlóggávuni skal, áðrenn flyting verður skrásett fyri eitt barn, ið higartil hevur búð saman við báðum foreldrum, viðkomandi, ið ikki flytur við, verða hoyrdur – hetta um viðkomandi ikki hevur skrivað undir fráboðan um flyting. Tað sama er galdandi, áðrenn flyting

hjá barni, ið higartil hevur búð saman við tí eina av foreldrunum, kann skrásetast, men viðkomandi ikki flytur við og ei heldur hevur skrivað undir fráboðanina um flyting.

Um foreldrini hjá einum barni ikki búgva saman, skal barnið skrásetast hjá tí av foreldrunum, sum barnið er mest hjá – tað er líkamikið, hvør hevur foreldramyndugleikan.

Um barnið er líka nógv hjá báðum foreldrum, skal barnið skrásetast at búgva hjá tí av foreldrunum, ið hevur foreldramyndugleikan, tó undantikið um foreldrini skrivliga hava boðað frá, at tey eru samd um, at barnið skal skrásetast hjá hinum av foreldrunum.

Um barnið er líka nógv hjá báðum foreldrum, og foreldrini hava felags foreldramyndugleika, verður barnið at skráseta hjá tí av foreldrunum, ið foreldrini eru samd um, sambært skrivligari fráboðan.

Um barnið er líka nógv hjá báðum foreldrum, og foreldrini ikki eru samd um bústaðarskrásetingina, hóast tey hava felags foreldramyndugleika, skal barnið framhaldandi vera skrásett at búgva á sama bústaði, sum áðrenn ósemjan stakk seg upp.

***Samvera***

Tann av foreldrunum, sum ikki hevur barnið búgvandi, hevur rætt til samveru við barnið (§ 15). Samvera er ein persónligur rættur og er ikki tengd at, hvør hevur foreldramyndugleikan. Bæði foreldrini kunnu søkja um at fáa ásett samveru, men Familjufyrisitingin kann bara áseta samveru, um samveruforeldrið ynskir tað.

Í flestu førum avtala foreldrini sjálvi, hvussu samveran skal skipast, og ein slík avtala kann brúkast til at tvingsilsfremja samveruna við hjálp frá fútarættinum.

Tað, at ein samveruavgerð kann tvingsilsfremjast, merkir, at samveruforeldrið kann fáa hjálp í fútarættinum, verður/-a barnið/børnini ikki latin til samveru. Somuleiðis kann bústaðarforeldrið fáa hjálp í fútarættinum, kemur/koma barnið/børnini ikki heim eftir samveru.

Familjufyrisitingin kann vanliga bara broyta eina avtalu um samveru, um viðurskiftini eru broytt munandi, síðan avtalan varð gjørd.

Eru foreldrini ikki samd um samveru, bjóðar Familjufyrisitingin barnaserkøna ráðgeving ella mekling. Verða foreldrini framvegis ikki samd, tekur Familjufyrisitingin avgerð út frá, hvat er best fyri barnið (§ 16). Sambært vegleiðing um samveru verður atlit m.a. tikið at aldrinum á barninum, sambandi millum samveruforeldrið og barnið, gerandisdegnum hjá barninum, arbeiði og bústað hjá foreldrunum v.m.

Familjufyrisitingin kann broyta eina avtalu ella avgerð um samveru, um tað er best fyri barnið, orsakað av munandi broyttum viðurskiftum (§ 16, stk. 2).

Familjufyrisitingin kann ikki áseta eina býtisskipan, har barnið er eins nógva tíð hjá báðum foreldrunum. Um foreldrini áður hava havt eina javnbýtisskipan (t.v.s. at barnið er líka nógvar dagar hjá báðum foreldrunum), er vanligt, at ein víðkað samvera verður ásett, við støði í javnbýtisskipanini.

Familjufyrisitingin kann í mesta lagi áseta eina 6/8-skipan. Tað vil siga, at barnið er 6 dagar hjá samveruforeldrinum og 8 dagar hjá bústaðarforeldrinum.

Familjufyrisitingin hevur ikki heimild at taka avgerð um samveru við onnur enn foreldrini.

Familjufyrisitingin kann í serligum førum nokta at áseta samveru ella seta avtalu ella avgerð um samveru úr gildi - § 16, stk. 3, t.d. tá talan er um langtíðarskilnað millum barnið og samveruforeldrið, óstøðufesti hjá samveruforeldrinum, høgt ósemjustøði millum foreldrini, harskap ella eftir ynski frá barninum.

Familjufyrisitingin kann taka fyribils avgerðir um samveru, meðan eitt mál um foreldramyndugleika ella samveru er undir viðgerð. Ein fyribils avgerð er galdandi, til ein endalig avgerð er tikin í málinum um foreldramyndugleika ella samveru - § 25

Familjufyrisitingin kann í serligum førum taka avgerð um samband umvegis telefon, bræv og líknandi, um møguleiki ikki er fyri vanligari samveru, ella um samvera er avmarkað, orsakað av t.d. arbeiðsstøðuni hjá samveruforeldrinum, t.d. sjófólk (§ 17).

*Samvera uttanlands*

Hevur bústaðarforeldrið foreldramyndugleikan einsamalt, geva samveruavgerðir hjá Familjufyrisitingini samveruforeldrinum bara rætt til samveru í Føroyum, danska kongaríkinum og hinum Norðurlondunum. Foreldrini kunnu sjálvi gera avtalu um, at barnið kann fara við samveruforeldrinum uttanlands.

Verða foreldrini ikki samd, kann umbøn sendast til Familjufyrisitingina um at taka støðu til, um barnið kann fara við samveruforeldrinum uttanlands í sambandi við samveru. Familjufyrisitingin metir, um tað er gott fyri barnið at fara við samveruforeldrinum uttanlands. Í nógvum førum ger Familjufyrisitingin av, um barnið sleppur at halda frítíð uttanlands ella at vitja familju uttanlands.

Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, kunnu bæði foreldrini ferðast við barninum uttanlands, uttan at tað krevur eina avgerð frá Familjufyrisitingini ella samtykki frá hinum av foreldrunum. Hetta er tó ikki galdandi um foreldrini eru ósamd um foreldramyndugleikan, ella um Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um at avmarkað rættin til samveru við barnið uttanlands, og sostatt krevur samtykki frá hinum av foreldrunum.

### *Hvør skal heinta og handa barnið?*

Verður avtala ikki gjørd um hetta foreldranna millum, er tað vanliga samveruforeldrið, sum skal heinta og handa barnið frá og til bústaðarforeldrið ella stovnin/skúlan, har barnið gongur. Samveruforeldrið ber í hesum føri eisini flutningsútreiðslurnar í sambandi við samveru.
Barnið kann eisini í summum førum verða heintað og handað av familju ella nærskyldum persónum hjá samveruforeldrinum.

Familjufyrisitingin kann eisini gera av, at bústaðarforeldrið skal heinta og/ella handa barnið. Hetta er bert í støðum, har tað verður mett at vera órímiliga trupult hjá samveruforeldrinum at heinta og/ella handa barnið í sambandi við samveru, ella í støðum har foreldrini hava avtalað at bústaðarforeldrið hevur ábyrgd av heintan og handan av barninum. Til dømis kann

Familjufyrisitingin gera av, at bústaðarforeldrið skal fara við barninum á flogvøll/ferjulegu, um samveruforeldrið býr uttanlands/ella á einari oyggj, har vegasamband ikki er ímillum.
Summi foreldur avtala, at børnini ferðast einsamøll. Til dømis bjóðar Atlantic Airways og SAS eina tænastu, har onkur ansar barninum á ferðini. Eru foreldrini ikki samd, um barnið kann ferðast einsamalt, tekur Familjufyrisitingin vanliga ikki avgerð um hetta.

***Hoyring av barninum***

Er barnið fylt 12 ár, skal tað verða hoyrt, áðrenn avgerð verður tikin um foreldramyndugleika ella samveru. Hetta er tó ikki galdandi, um mett verður, at ein samrøða skaðar barnið. Er barnið undir 12 ár, skal barnið hoyrast, um barnið er búgvið til tað, og um umstøðurnar í málinum loyva tí.

***Kunning um barnið***

Tann av foreldrunum, sum ikki hevur foreldramyndugleika, hevur rætt til kunning um viðurskifti hjá barninum frá skúla, dagstovni, almanna- og heilsuverki, umframt privatum sjúkrahúsi og virkandi læknum og tannlæknum. Stovnurin kann nokta at geva upplýsingar, um tað skaðar barnið.

Familjufyrisitingin kann í serligum førum eftir umbøn frá foreldramyndugleikahavanum ella einum av nevndu stovnum taka rættin at fáa kunning frá tí av foreldrunum, ið ikki hevur foreldramyndugleika.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið hevur til endamáls at tryggja, at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa, og at staðfesta rættindi og skyldur. Hetta er ásett í samgonguskjalinum frá september 2019.

Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru, soleiðis at hon verður nútíðarhóskandi, eins og endamálið er at laga lóggávuna á økinum til føroysk viðurskifti.

Endamálið við uppskotinum er at tryggja barnsins besta, og at atlit altíð verður tikið at barnsins besta, tá avgerðir sambært lógini. verða tiknar Allar avgerðir viðvíkjandi barninum skulu altíð takast soleiðis, at tað eru viðurskiftini hjá tí einstaka barninum, sum koma í fremstu røð.

Uppskotið tekur í størri mun atlit at, at tað eru bæði foreldrini, sum hava ábyrgd av barninum, og at foreldrini hava somu skyldur mótvegis barninum.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Ein grundleggjandi broyting í uppskotinum er, at Familjufyrisitingin fær heimild at taka fleiri avgerðir.

Sambært galdandi lóg kann Familjufyrisitingin taka avgerð um samveru og bara í ávísum førum taka avgerð um foreldramyndugleika. Familjufyrisitingin kann bara taka avgerð um foreldramyndugleika, tá ið talan er um fyribils avgerðir ella í sambandi við andlát.

Eru foreldrini ósamd um foreldramyndugleikan og bústaðin hjá barninum, mugu tey leggja málið fyri rættin til støðutakan.

Sambært uppskotinum verður tað frameftir Familjufyrisitingin, sum tekur avgerðir um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru. Sostatt slepst undan einum ofta drúgvum og kostnaðarmiklum rættarmáli.

Mett verður, at Familjufyrisitingin hevur serkunnleika til at taka væl grundaðar og væl skikkaðar avgerðir á økinum. At Familjufyrisitingin er fyrsti myndugleiki, sum tekur eina fyrisitingarliga avgerð, er eisini við til at betra um rættartrygdina hjá borgarum, við tað at avgerðirnar hjá Familjufyrisitingini kunnu kærast til kærunevndina í almanna-, familju og heilsumálum.

At avgerðir nú verða tiknar av Familjufyrisitingini og ikki av rættinum, er tó ikki til hindurs fyri, at mál eftirfylgjandi verða løgd fyri rættin til støðutakan.

Áðrenn eitt mál verður lagt fyri rættin, skulu allir kærumøguleikar vera troyttir.

***Barnsins besta***

Tryggjað verður, at allar avgerðir verða tiknar við atliti at barnsins besta, og at fyrilit skal takast fyri sjónarmiðunum hjá barninum.

Meginreglan um barnsins besta er grundarlagið undir lógaruppskotinum. Meginreglan um barnsins besta er eisini í samsvari við ST-barnarættindasáttmálan. Barnarættindasáttmálin er ein roynd at geva barninum besta møguleika, og rætt til ein virðiligan barndóm. Børn hava brúk fyri serligari verju og umsorgan, eisini løgfrøðiliga. Ynskið er, at barnið kann vaksa upp í einum tryggum umhvørvi, vart fyri harðskapi, tvingsli og vart fyri at vera vitni til harðskap. Barnið skal virðast og hoyrast, og allar avgerðir sambært hesi lóg skulu takast við atliti at barnsins besta.

Staðfest verður eisini, at tað er til barnsins besta, at barnið skal hava samband við bæði síni foreldur, og at bæði mamman og pápin hava ábyrgd av barnsins uppvøkstri og menning.

Fyri at tryggja barnsins besta verður ásett, at er ein av foreldrunum dømdur fyri grovan og vandamiklan kriminalitet, so fær hesin sum meginregla ikki foreldramyndugleikan ella lut í foreldramyndugleikanum, at barnið ikki býr hjá viðkomandi og ikki hevur samveru ella annað samband við barnið.

***Foreldramyndugleiki***

Við nýggju lógini um foreldramyndugleika og samveru verður tryggjað, at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa. Hetta er ásett í samgonguskjalinum frá september 2019.

Hetta verður m.a. gjørt við at víðka um møguleikan hjá foreldrum at fáa felags foreldramyndugleika, eftir at hava búð saman í 10 mánaðir eftir, at barnið er føtt. Sum nakað nýtt fær Familjufyrisitingin heimild at taka avgerð um felags foreldramyndugleika. Soleiðis slepst undan at velja millum tvey líka væl skikkað foreldur.

Við nýggju lógini verða rættindi og skyldur staðfest. Hetta er somuleiðis ásett í samgonguskjalinum frá september 2019. Rættindi hjá foreldrum at taka avgerðir viðvíkjandi persónligu viðurskiftunum hjá barninum í samsvari við áhugamál og tørvin hjá barninum og ábyrgdin at tryggja umsorgan og tryggleika hjá barninum eru óbroytt.

Samsvarandi galdandi praksis verður avgerðarrætturin hjá foreldrunum staðfestur við lóg.

Skilt verður millum týðandi avgerðir um barnið og yvirskipað viðurskifti í gerandisdegnum hjá barninum. Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, skulu tey vera samd um týðandi avgerðir um barnið, tað er m.a. verjumál, týðandi medisinskar viðgerðir, val av skúla og útbúgving, frítíðarskúla, vandamikið frítíðarítriv, trúðarviðurskifti, hjúnaband og pass. Flyting uttanlands er eisini ein týðandi avgerð, sum foreldur við felags foreldramyndugleika skulu vera samd um. Í hesum høpi verða Grønland og Danmark nú roknað sum útland og eru tí ikki longur undantikin kravinum um semju.

Ásett verður, at bústaðarforeldrið kann einsamalt taka avgerðir um yvirskipað viðurskifti í gerandisdegnum. Talan er m.a. um beinleiðis dagliga umsorgan, frítíðarítriv, innanlandsflyting skúlasálarfrøðing og barnaserkøna ráðgeving.

Rætturin hjá bústaðarforeldrinum til at gera av, hvar í landinum barnið skal búgva, hevur higartil verið tulkað soleiðis, at bústaðarforeldrið hevur havt rætt til at flyta við barninum innan fyri ríkið.

Við uppskotinum verður hetta broytt soleiðis, at Danmark og Grønland nú verða roknað sum útland. Tað merkir, at bústaðarforeldrið ikki longur kann flyta uttanlands, so sum til Danmarkar ella til Grønlands við barninum, men bara kann flyta innanlands við barninum. Hetta, tí at mett verður, at tað er ov víðfevnt, at bústaðarforeldrið einsamalt kann taka avgerð um at flyta av landinum við barninum.

Samveruforeldrið kann einsamalt taka avgerðir, sum eru tengdar at samveru, so sum beinleiðis umsorgan, songartíð, frítíðarítriv v.m.

***Bústaðurin hjá barninum***

Galdandi rættarstøða er soleiðis, at um foreldrini hava felags foreldramyndugleika, og tey ikki verða samd um, hvørjum barnið skal búgva hjá, kann spurningurin um bústaðin hjá barninum bara verða avgjørdur við, at rætturin tekur avgerð um, at felags foreldramyndugleikin verður strikaður og latin øðrum av foreldrunum.

Hvørki Familjufyrisitingin ella Føroya rættur hava heimild til serstakt at taka avgerð um bústaðin hjá barninum.

Sum nakað nýtt fær Familjufyrisitingin heimild til serstakt at taka avgerð um bústaðin hjá barninum. Við hesi heimild fáa foreldrini betri møguleika fyri at varðveita felags foreldramyndugleika, av tí at bústaðurin hjá barninum ofta kann vera tað, sum ósemjan snýr seg um, tá ið foreldrini ynskja at strika felags foreldramyndugleika.

Tá ið Familjufyrisitingin tekur avgerð um bústaðin hjá barninum, skal atlit takast at møguleikanum hjá hinum av foreldrunum, sum eisini hevur lut í foreldramyndugleikanum, at

taka sær av barninum og hava umsorgan fyri barninum og fyri at varðveita sambandið við barnið, um barnið skal búgva uttanlands.

Hinvegin skal atlit eisini takast at møguleikanum hjá einum av foreldrunum at flyta í sambandi við, at viðkomandi ætlar at nema sær útbúgving, tað veri seg bæði innanlands og uttanlands. Dentur skal í hesum sambandi leggjast á, at viðkomandi hevur fingið tryggjað pláss á einum skúla. Tað er sostatt ikki nokk, at viðkomandi bara hevur eina ætlan um at nema sær útbúgving uttanlands.

***Samvera***

Ásetingarnar um samveru verða nágreinaðar og víðkaðar. Verandi orðing verður broytt, soleiðis at tað er barnið, og ikki annað av foreldrunum, sum hevur rætt til samveru. Hetta fyri at tryggja meginregluna um, at alt verður gjørt til barnsins besta. Sambandið hjá barninum við bæði foreldur skal í størst møguligan mun varðveitast. Her verður hugsað um barnsins besta við at staðfesta, at tað er barnið, ið hevur rætt til samveru við bæði foreldur – eisini tann, sum tað ikki býr hjá. Foreldrini hava felags ábyrgd av, at barnið varðveitir sambandið við tann av foreldrunum, ið barnið ikki býr hjá.

Hetta verður m.a. gjørt við at áseta, at bæði foreldur sum meginregla skulu deilast um ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru. Familjufyrisitingin fær heimild til í serligum førum at taka avgerð um ferðaútreiðslur, um foreldrini ikki verða samd um tað.

Sum nakað nýtt kann samvera verða ásett við onnur enn foreldur, sum barnið er knýtt at, um einki samband er við samveruforeldrið, ella um viðkomandi er deyður.

Familjufyrisitingin fær greiða heimild at taka avgerð um ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru bæði innanlands og uttanlands.

Verandi skipan um annað samband umvegis telefon og brævaskifti verður dagført, soleiðis at hon verður meiri tíðarhóskandi.

Í lógini verður nágreinað, hvør kann taka avgerð um samveru, tá talan er um børn, sum eru umsorganaryvirtikin. Við uppskotinum verður heimildin hjá Familjufyrisitingini at áseta samveru ella annað samband, tá talan er um børn, ið eru umsorganaryvirtikin, strikað.

Sambært galdandi rættarstøðu er talan um tvímálsræði, tá ið talan er um umsorganyvirtikin børn. Mett verður, at hetta er óneyðugt og skapar óneyðugan iva um galdandi rættarstøðu við tvímálsræði. Somuleiðis verður mett, at tað er meira nærliggjandi, at tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, og ikki Familjufyrisitingin, sum ásetir samveru, tá talan er um umsorganaryvirtikin børn.

Viðvíkjandi kunning um barnið verður nágreinað nærri, hvørjar treytirnar eru fyri at fáa atgongd til upplýsingar um barnið. Í høvuðsheitum skal tann av foreldrunum, sum hevur barn búgvandi, vanliga kunna hin um nakað nýtt er í gerandisdegnum hjá barninum. Galdandi áseting er, at um viðkomandi ikki hevur part í foreldramyndugleikanum, hevur hann ikki rætt til at luttaka í foreldrasamrøðum um barnið ella rætt til at fáa innlit í eitt mál um barnið – uttan so, at hon gevur loyvi til tess. Ásett verður, at tann av foreldrunum, sum ikki hevur foreldramyndugleika, hevur rætt til kunning um viðurskifti hjá barninum frá skúla,

dagstovni, almanna- og heilsuverki, umframt privatum sjúkrahúsi og virkandi læknum og tannlæknum.

***Hoyring av barninum***

Áðrenn ein avgerð verður tikin um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru, skal barnið takast við beinleiðis ella óbeinleiðis í málsviðgerðini. Barnið skal altíð takast við, og tað er ein rættur og ikki ein skylda hjá barninum at luttaka.

Áskoðan og sjónarmið hjá barninum kunnu verða lýst við at hava eina samrøðu við barnið. Áskoðanin hjá barninum kann eisini koma til sjóndar á annan hátt, eitt nú við einari barnaserkønari kanning, innheintan av upplýsingum frá almennum myndugleikum, upplýsingar frá foreldrunum el.l.

Einki aldursmark er fyri, nær barnið skal skal hoyrast, tó skal atlit í hesum sambandi takast at aldrinum á barninum. Ein samrøða er t.d. ikki væl hóskandi til smærri børn. Tá kann vera viðkomandi við einari barnaserkønari kanning, einum ummæli frá ansingarstovninum ella øðrum serkønum, sum kenna barnið.

Rætturin hjá børnum at verða hoyrd í sambandi við eina avgerð um foreldramyndugleika, bústaðin og samveru verður harafturat víðkaður til, at eitt barn, sum hevur fylt 10 ár, sjálvt kann venda sær til Familjufyrisitingina við áheitan um, at Familjufyrisitingin kallar foreldrini á fund um foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum ella samveru.

Tað verður nágreinað í lógini, at Familjufyrisitingini hevur heimild at seta í verk eina barnserkøna kanning og biðja um ummæli frá serkønum um foreldrini í sambandi við viðgerð av málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru.

Endamálið er at lýsa sjónarmiðið hjá barninum.

Ein barnaserkøn kanning kann t.d. vera viðkomandi í málum, har barnið er í einari útsettari støðu, í málum, har ósemjan er høg, og í málum, har annað ella bæði foreldrini hava álvarsamar trupulleikar. Ein barnaserkøn kanning kann eisini vera gagnlig í málum, har skilnaðurin millum barnið og samveruforeldrið hevur verið langur, har tað er uppáhald um harðskap, og í málum, har stórir samstarvstrupulleikar eru millum foreldrini.

Familjufyrisitingin kann eisini biðja um ummæli frá serkønum um foreldrini, har dentur verður lagdur á evnini hjá foreldrunum at taka sær av barninum uttan at barnið verður drigið inn í málið.

Eitt ummæli frá serkønum um foreldrini er t.d. viðkomandi í málum, har annað av foreldrunum hevur sálarligar trupulleikar ella trupulleikar av misnýtslu av slíkum slagi, at viðkomandi ikki kann taka sær av barninum. Ummæli frá serkønum er eisini viðkomandi í málum, har annað av foreldrunum vísir sonevnda samstarvssjikanu.

Ummælið skal vera frá serkønum, sum hava neyðugan serkunnleika til á nøktandi hátt at lýsa viðurskiftini hjá foreldrunum, t.d. frá einum løggildum sálarfrøðingi, einum sálarsjúkulækna ella øðrum serfrøðingi.

Sum nakað nýtt skal sálarfrøðingur, sum hevur ábyrgd av teimum kanningum og ummælum, sum Familjufyrisitingin brúkar sum part av grundarlagnum fyri eini avgerð, vera løggildur. Hetta fyri at tryggja rættartrygd hjá borgarum, og serliga tí at ein niðurstøða frá einum løggildum sálarfrøðingi kann verða eftirmett av Psykolognævnet sum óheftum myndugleika.

***Ráðgeving og mekling***

Familjufyrisitingin fær greiða heimild at bjóða foreldrum, børnum og øðrum, sum barnið er knýtt at, barnaserkøna ráðgeving, mekling og aðra viðkomandi ráðgeving í sambandi við ósemjur um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru.

Familjufyrisitingin hevur skyldu at bjóða ráðgeving og mekling. Umframt barnaserkøna ráðgeving og mekling, verður heimildin víðkað, soleiðis at Familjufyrisitingin nú eisini kann bjóða aðra viðkomandi ráðgeving.

Sum nakað nýtt kann Familjufyrisitingin eisini bjóða øðrum, sum barnið er knýtt at, ráðgeving og mekling.

Somuleiðis kann Familjufyrisitingin seta í verk barnaserkøna kanning og biðja um ummæli frá serkønum í málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið er sent til ummælis hjá:

- Familjufyrisitingini,
- Dátueftirlitinum,
- Advokatfelag Føroya,
- Javnstøðunevndini,
- Barnabæta,
- MEA – húsið fyri familjumenning
- Føroya Kærustovni,
- Føroya rætti,
- Almannaverkinum,
- Barnaverndarstovuni,
- Pedagogfelag Føroya,
- Felagnum Sálarfrøðingar,
- Føroya Landfúta,
- Gigni (Heilsutrygd)
- stjórnarráðunum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar við sær fyri Familjufyrisitingina, sum framvegis skal umsita lóg um foreldramyndugleika og samveru og seta broytingarnar í uppskotinum í verk.

Við uppskotinum fær Familjufyrisitingin heimild at taka fleiri avgerðir, eins og verandi virksemi á Familjufyrisitingini skal tillagast broytingum í uppskotinum.

Hetta hevur m.a. við sær munandi økta arbeiðsbyrðu í mun til málsviðgerð av málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru o.a.

Hetta hevur eisini við sær, at Familjufyrisitingin skal gera tillagingar í kt-skipanum, oyðubløð, og vegleiðingar skulu framleiðast og tillagast

Familjufyrisitingin skal eisini menna fleiri tilboð um ráðgeving og mekling, og ymisk skeið skulu mennast.

Umsitingin av lógini í uppskoti fer tí at krevja økta starvsfólkaorku.

Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað verður framvegis Familjufyrisitingin, sum skal umsita lóg um foreldramyndugleika og samveru. Mett verður, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar við sær fyri Familjufyrisitingina, sum skal seta í verk broytingarnar í uppskotinum. Við uppskotinum fær Familjufyrisitingin heimild at taka fleiri avgerðir, eins og verandi virksemi á Familjufyrisitingini skal tillagast broytingum í uppskotinum.

Hetta hevur við sær broytingar í arbeiðsuppgávunum hjá Familjufyrisitingini.

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur við sær eina uppraðfesting av rættindum hjá børnum til bæði foreldur.

Hetta verður gjørt við at víðka um møguleikan hjá foreldrum at fáa felags foreldramyndugleika. Sum nakað nýtt verður skotið upp, at ógift foreldur fáa felags foreldramyndugleika, um tey hava búð saman í 10 mánaðir, áðrenn barnið verður føtt.

Sum nakað nýtt kunnu myndugleikar somuleiðis taka avgerð um, at foreldrini skulu hava felags foreldramyndugleika. Sostatt er ikki longur neyðugt at velja í millum tvey líka væl egnaði foreldur.

Sum nakað nýtt fær rætturin nú heimild at taka avgerð um, hvar barnið skal búgva, uttan at rætturin skal taka støðu til spurningin um foreldramyndugleikan. Við hesi heimild fáa foreldrini betri møguleika fyri at varðveita felags foreldramyndugleika, av tí at bústaðurin hjá barninum ofta kann vera tað, sum ósemjan snýr seg um, tá ið foreldrini ynskja at strika felags foreldramyndugleika.

Høvuðsendamálið við uppskotinum er at tryggja, at allar avgerðir sambært hesi lóg verða tiknar við atliti at barnsins besta. Uppskotið tryggjar harvið, at børn í Føroyum í betri mun vera vard.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er ikki í andsøgn við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki nýggjar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Sambært § 3 hevur tann, sum hevur foreldramyndugleikan, skyldu til at hava umsorgan fyri barninum í samsvari við áhugamál og tørvin hjá barninum.

Sambært § 18 hevur tann av foreldunum, sum ynskir at flyta ella at flyta saman við barninum, skyldu til at kunna hin av foreldrunumforeldrið um tað í seinasta lagi 6 vikur áðrenn flytingina.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í § 43 verður heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um viðgerð av ymiskum málum. Landsstýrismaðurin fær heimild at áseta reglur um viðgerð av málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru og annað samband. Reglur kunnu eisini ásetast um viðgerð av ferðaútreiðslum í sambandi við samveru, barnaserkøna ráðgeving, barnaserkøna kanning og mekling og viðgerð av kærum.

Í § 44, stk. 2 verður heimilað landsstýrismanninum at áseta reglur um viðurskiftini millum føroyskar og aðrar norðurlendskar rættarreglur um foreldramyndugleika og samveru.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar við sær enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

Ásetingin samsvarar við § 1 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru og ásetir, nær børn og ung eru undir foreldramyndugleika. Ung, yngri enn 18 ár, sum eru í parlagi, ella sum sjálvi hava fingið børn, eru framvegis undir foreldramyndugleika.

Um ein, sum er yngri enn 18 ár, verður giftur, inniber tað, at foreldramyndugleikin fellur burtur, og viðkomandi verður myndugur sambært § 1, stk. 1 í verjumálslógini

### Til § 2

Ásetingin samsvarar við § 2, stk. 2 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásett verður, at barnið hevur rætt til umsorgan og tryggleika. Barnið skal farast við við virðing fyri samleikanum hjá tí og skal ikki vera fyri likamligum ella sálarligum ágangi. Likamligur harðskapur í sambandi við uppaling er revisiverdur.

*Stk. 2*
Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi, men ásetir longu galdandi praksis á økinum um, at allar avgerðir skulu takast við atliti at barnsins besta. Í lógini verður ikki staðfest, hvat er best fyri barnið. Talan er um ein rættarligan standard, sum fylgir menningini í samfelagnum. Talan skal altíð vera um eina ítøkiliga og individuella meting av tørvinum hjá einstaka barninum.

Í metingini av, hvat er best fyri barnið, skal atlit takast at meginregluni um, at barnið hevur rætt til bæði foreldur. Eisini skal atlit takast at, um annað av foreldrunum uttan rímiliga orsøk forðar hinum í at hava samband við barnið, sonevnd samverusjikana.

*Stk. 3*
Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Ásett verður, at í øllum viðurskiftum um barnið skal fyrilit takast fyri sjónarmiðunum hjá barninum, og at atlit í hesum sambandi skal takast at aldrinum og búnaskapi hjá barninum.

Við ásetingini verður staðfest, at sjónarmiðini hjá barninum altíð eiga at verða lýst, tá ið avgerðir verða tiknar. Sjónarmiðini hjá barninum kunnu t.d. verða lýst umvegis ummæli frá øðrum myndugleikum v.m., serliga tá talan er um smábørn. Ásetingin staðfestir eisini meginregluna í lógini um, at allar avgerðir skulu takast við atliti at barnsins besta.

### Til § 3

Ásetingin samsvarar við § 2 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru og ásetir rættindi og skyldur hjá tí, sum hevur foreldramyndugleikan yvir einum barni. Ásetingin fevnir eisini um tey, sum hava foreldramyndugleikan, hóast tey ikki eru foreldur at barninum. At hava foreldramyndugleika yvir einum barni inniber eina umsorganarskyldu mótvegis barninum, og at tann, sum hevur foreldramyndugleikan kann taka avgerðir um persónligu viðurskiftini hjá barninum í samsvari við áhugamál og tørvin hjá barninum, so sum hvussu barnið skal eita, hvar tað skal búgva og ganga í skúla, hvørja átrúnaðaliga uppaling barnið skal fáa, um barnið skal hava pass v.m.

Skyldur og ábyrgd skulu lagast eftir støðu og korum hjá bæði foreldrum og barninum.

*Stk. 2.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi, men ásetir longu galdandi praksis á økinum. Ásetingin ásetir avgerðarrættin hjá foreldrunum, tá ið tey hava felags foreldramyndugleika. Um rættindi og skyldur hjá foreldramyndugleikahavanum verður víst til viðmerkingarnar til § 3, stk. 1.

Í ásetingini verður skilt millum týðandi avgerðir um barnið og yvirskipað viðurskifti í gerandisdegnum hjá barninum. Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, skulu tey vera samd um týðandi avgerðir um barnið, tað er m.a. verjumál, týðandi medisinskar viðgerðir, val av skúla og útbúgving, frítíðarskúla, vandamikið frítíðarítriv, trúðarviðurskifti, hjúnaband og pass. Flyting uttanlands er eisini ein týðandi avgerð, sum foreldur við felags foreldramyndugleika skulu vera samd um. Í hesum høpi verða Grønland og Danmark roknað sum útland.

Bústaðarforeldrið kann einsamalt taka avgerðir um yvirskipað viðurskifti í gerandisdegnum. Talan er m.a. um beinleiðis dagliga umsorgan, frítíðarítriv, innanlandsflyting, skúlasálarfrøðing og barnaserkøna ráðgeving.

Rætturin hjá bústaðarforeldrinum til at gera av, hvar í landinum barnið skal búgva, hevur higartil verið tulkað soleiðis, at bústaðarforeldrið hevur havt rætt til at flyta við barninum innan fyri ríkið.

Við uppskotinum verður hetta broytt soleiðis, at bústaðarforeldrið ikki longur kann flyta uttanlands við barninum, men bara kann flyta innanlands við barninum. Hetta, tí at mett verður, at tað er ov víðfevnt, at bústaðarforeldrið einsamalt kann taka avgerð um at flyta av landinum við barninum.

Í hesum sambandi verður víst til § 18 og viðmerkingarnar til § 18 um, at Familjufyrisitingin kann taka avgerð um bústaðin hjá barninum, so sum at avgerð kann takast um, at barnið kann búgva hjá tí av foreldrunum, sum býr ella vil búgva uttanlands.

Samveruforeldrið kann einsamalt taka avgerðir, sum eru tengdar at samveru, íroknað beinleiðis umsorgan, songartíð, frítíðarítriv m.v.

Tann av foreldrunum, sum ikki hevur foreldramyndugleika, kann ikki krevja at sleppa við til foreldrafundir, foreldrasamrøður, tiltøk á stovni v.m.

Dagstovnar ella skúlar kunnu tó heita á bæði foreldrini um at luttaka til t.d. foreldrasamrøður, um tað verður mett at vera tað besta fyri barnið.

Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, hava tey bæði rætt til t.d. at luttaka til tiltøk í dagstovni ella skúla, foreldrafundum, vera við til samrøður um barnið v.m., at hava samband við lækna, sjúkrahús, sosialu myndugleikarnar og barnavernd, og at fáa innlit í øll skjøl ella upplýsingar viðvíkjandi barninum – men ikki upplýsingar um hin av foreldrunum.

*Stk. 3.* Ásetingin samsvarar við § 3 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Ásett er, at bæði foreldur skulu geva samtykki til, at barnið flytur av landinum, um foreldrini ikki eru samd um foreldramyndugleikan.

Sambært galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru hevur landið higartil verið tulkað sum ríkið. Hetta verður nú broytt soleiðis, at landið verður tulkað sum Føroyar. Hetta merkir, at Danmark og Grønland verða roknað sum útland.

Við ósemju skal verða staðfest, at foreldrini eru ósamd um, hvør av teimum skal hava foreldramyndugleikan einsamallur. Ósemjan kann t.d. verða staðfest við, at mál er lagt fyri rættin ella er ávegis, ella at barnið er tikið frá ella afturhildið av einum av foreldrunum.

Tað skal ikki nógv til fyri at staðfesta eina ósemju, sum elvir til kravið um samtykki. At barnið verður flutt frá sínum vanliga tilhaldsstaði ella verður afturhildið uttanlands, hóast mótmæli frá hinum foreldrinum, t.d. aftan á eina feriu, kann í sær sjálvum vera tekin um ósemju.

Samtykki krevst ikki, um ósemjan bara snýr seg um, hvørt barnið skal uppihalda sær uttanlands ella um onnur viðurskifti um útinnan av foreldramyndugleikanum. Hvussu langt uppihald talan er um, er tengt at umstøðunum, og ein ítøkilig meting skal gerast í hvørjum einstøkum føri. Jú longri uppihaldið er, jú minni er rásarúmið.

Ásetingin fevnir eisini um føri, har barnið ferðast einsamalt ella saman við øðrum enn einum av foreldrunum.

Vantandi samtykki til at taka barnið við av landinum ella til at leingja uppihaldið uttanlands viðførir, at talan er um ólógliga burturflyting ella ólógligt afturhald av barninum.

Hóast talan er um ólógliga burturflyting, eru ongar reglur í Føroyum um at fáa barnið útflýggjað.

Evroparáðssáttmálin frá 1980, Haagersáttmálanin frá 1980 um borgararættarligu viknaðirnar av altjóða barnaburturflyting og Haagerbarnaverndarsáttmálin eru ikki galdandi fyri Føroyar.

§ 19 um skyldu til at kunna um flyting er eisini galdandi í sambandi við flyting av landinum. Ein kunning sambært § 19 frítekur ikki bústaðarforeldrið frá at heinta inn samtykki frá hinum til flytingina.

Kravið um samtykki er ikki galdandi, um avgerð er tikin um bústaðin ella um uttanlandsferð sambært § 18, stk. 1, 2. pkt ella § 27.

**Til § 4**
Ásetingin samsvarar við § 2, stk. 2 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásetingin samsvarar við § 25, stk. 2 í verjumálslógini. Ásetingin, sum bara kann brúkast av foreldrum, sum hava foreldramyndugleikan, er bara galdandi fyri inntøku og ikki ogn hjá barninum.

**Til § 5**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Tað er ein greið haldanaregla um, at tað er best fyri barnið, at tað av foreldrunum, sum er dømt sambært ásetingini í uppskoti, ikki hevur foreldramyndugleikan ella lut í foreldramyndugleikanum, at barnið ikki býr hjá viðkomandi og ikki hevur samveru ella annað samband við barnið.

Talan er um grov og vandamikil likamsálop, sum verða mett at hava týdning í mun til evnini hjá foreldrunum at hava umsorgan fyri barninum.

Um annað av foreldrunum er dømdur fyri kriminalitet, sum ikki er nevndur í ásetingini í uppskoti, kann hetta vera partur av ítøkiligu metingin av barnsins besta, sbrt. § 4 í einum máli um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru og annað samband. Hetta er eisini galdandi, um annað av foreldrunum er dømdur aðra revsing enn treytaleysa fongsulsrevsing v.m., t.d. treytaða fongsulsrevsing ella bót, fyri kriminalitet fevndan, av § 5. Kriminaliteturin hevur tó bara týdning, um talan er um atgerðir, sum sáða iva um, hvørt viðkomandi er skikkaður til at hava umsorgan fyri barninum. Familjufyrisitingin og rætturin skulu í hesum sambandi leggja dent á, at avgerðir sbrt. lógini skulu viðvirka til at tryggja trivnaðin hjá barninum og verja barnið móti harðskapi ella øðrum, sum setir barnið í vanda, so sum at vera vitni til harðskap, sbrt. § 2, stk. 2.

Ásetingin er galdandi, uttan mun til móti hvørjum kriminaliteturin er framdur, og tað hevur ongan týdning, um kriminaliteturin er framdur í Føroyum ella uttanlands, og um viðkomandi er dømdur har. Ásetingin fevnir eisini um dóm fyri brotsroynd, sbrt. § 21 í revsilógini, og medvirkni, sbrt. § 23 í revsilógini.

Víkjast kann bara frá haldanarregluni, um tað út frá einari ítøkiligari meting verður hildið at vera best fyri barnið. Talan er um eitt snævurt undantak, og tað er atlitið at barnsins besta, sum er avgerandi. Ein heildarmeting skal gerast av, hvat verður mett at vera best fyri barnið. Í hesum sambandi skal atlit m.a. takast at sambandinum millum barnið og viðkomandi, sum hevur framt harðskapin, barnsins áhuga í at varðveita sambandi við viðkomandi, hvat slag av brotsgerð talan er um, umstøðurnar rundan um brotsgerðina, undir hesum um barnið var vitni til brotsgerðina og tíðina, sum er liðin, síðan brotsgerðin varð framd.

Serligar umstøður, sum t.d. at parturin var ungur, tá ið brotsgerðin varð framd, ella at long tíð er liðin, síðani viðkomandi varð leyslatin, skulu takast við í metingini av barnsins besta, men kunnu ikki í sær sjálvum grunda, at vikið verður frá haldanarregluni. Tað hevur eisini týdning, í hvørjum høpi brotsgerðin er framd, eins og tíðarbærið hevur týdning.

Undantakið kann út frá einari ítøkiligari meting av barnsins besta vera viðkomandi í førum, har mamman, orsakað av áhaldandi harðskapi í parlagnum, er atvoldin til, at samlivin, sum ikki er pápi at barninum, doyr, og har barnið er tætt knýtt at mammuni. Tað kann eisini verða viðkomandi í teimum førum, har pápin at barninum hevur verið harðligur móti mammuni í longri tíð, og mamman sum úrslit av hesum fremur harðskap móti pápanum. Somuleiðis kann undantakið umhugsast í førum, har tann av foreldrunum fyri fleiri árum síðani er dømdur fyri harðskap, sum hóast hann ikki verður mettur sum álvarsligur, verður flokkaður sum grovur harðskapur, einki tætt samband hevur verið millum tann av foreldrunum og viðkomandi, sum hevur verið útsettur fyri harðskapi, hin hevur vitað av kriminalitetinum, meðan tey hava livað saman, barnið og viðkomandi hava eitt tætt og gott samband, og tað annars ikki eru viðurskifti, sum skunda undir, at tað ikki er best fyri barnið at varðveita sambandi við viðkomandi. Undantakið kann eisini verða serliga viðkomandi í førum, har bæði foreldrini eru dømd fyri kriminalitet, sum er fevndur av § 5.

Er illgruni um, at kriminalitetur, fevndur av § 5, er framdur, skal Familjufyrisitingin kanna hetta nærri. Illgrunin er ofta grundaður á upplýsingar frá hinum av foreldrunum, men kann eisini koma fram í málsviðgerðini, t.d. við innheintan av upplýsingum frá barnaverndartænastuni o.ø.

Familjufyrisitingin metir um, hvussu málið skal upplýsast. Familjufyrisitingin kann lýsa málið við at innheinta upplýsingar frá foreldrunum og t.d. biðja um eina útskrift av dóminum. Um tað kann leggjast til grund, at annað av foreldrunum hevur framt harðskap, og viðkomandi ikki vil leggja fram útskrift av dóminum, kann hetta viðføra rættargonguspell.

**Til § 6**

Ásetingin samsvarar við § 4 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru og ásetir foreldramyndugleikan hjá giftum foreldrum. Foreldur, sum eru gift, fáa sjálvvirkandi felags foreldramyndugleika.

Sí § 10 um týdningin av, at foreldrini fara hvør til sítt, verða sundurlisin ella skild, og týdningin av, at hjúnabandið verður ógildað.

S*tk. 2.* Ásetingin regulerar foreldramyndugleika í teimum førum, har foreldrini eru sundurlisin, tá ið barnið verður føtt. Í hesum førum hevur mamman foreldramyndugleikan einsamøll. Koma foreldrini saman aftur, eftir at barnið er føtt, men meðan tey enn eru sundurlisin, fellur sundurlesingin burtur, og foreldrini fáa sjálvvirkandi felags foreldramyndugleika.

*Stk. 3.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Foreldur, sum eru skild, men sum hava verið gift innan fyri seinastu 10 mánaðirnar, áðrenn barnið varð føtt, hava sjálvirkandi felags foreldramyndugleika. Hetta er treytað av, at faðirskapurin hjá fyrrverandi hjúnafelaganum er staðfestur við váttan ella við avgerð sbrt. ásetingunum í lóg um rættarstøðu barnanna.

**Til § 7**

Ásetingin samsvarar við § 5 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru og ásetir, at mamman hevur foreldramyndugleikan einsamøll, um foreldrini ikki eru gift. Foreldrini kunnu tó avtala, at tey skulu hava felags foreldramyndugleika. Ein slík avtala skal fráboðast Familjufyrisitingini fyri at fáa virknað. Sí viðmerkingarnar til § 9.

*Stk. 2.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Í samgonguskjalinum frá 14. september 2019 er ásett, at foreldramyndugleikalógin skal endurskoðast, soleiðis at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa. Ásetingin í uppskoti er við til at víðka um møguleikan fyri at staðfesta felags foreldramyndugleika og samstundis at betra um rættin hjá barninum til bæði síni foreldur.

Sambært ásetingini í uppskoti fáa foreldur sjálvirkandi felags foreldramyndugleika, um maðurin er at rokna sum pápi sambært váttan ella dómi um faðirskap eftir lóg um rættarstøðu barnanna, og um tey hava búð saman í samanhangandi 10 mánaðir, áðrenn barnið varð føtt. Felags bústaður skal vera skrásettur, áðrenn barnið er føtt.

Er ivi um, hvørt partarnir hava búð saman og nær, og er felags bústaður ikki skrásettur, er støðan ikki fevnd av ásetingini. Ein pápi, sum metir seg hava búð saman við mammuni í einum tíðarskeiði, uttan at hetta er skrásett í landsfólkayvirlitinum, er ikki fevndur av ásetingini. Ein pápi, sum ikki hevur búð saman við mammuni, men í einum tíðarskeiði hevur livað saman við henni, er heldur ikki fevndur av ásetingini. Verða partarnir ikki samdir um felags foreldramyndugleika, mugu tey fara undir eitt mál sbrt. § 14.

Um mamman innan fyri seinastur 10 mánaðirnar, áðrenn barnið verður føtt, hevur livað í fastasamlívi við einum manni, men samlívið er steðgað, áðrenn barnið verður føtt, og mamman tá er gift, verður ektamaðurin sjálvvirkandi skrásettur sum pápi at barninum sbrt. lóg um rættarstøðu barnanna, og tey fáa felags foreldramyndugleika, sbrt. § 6, stk. 1.

Vil mamman ikki, at felags foreldramyndugleiki heldur áfram, kann hon leggja málið fyri Familjufyrisitingina til støðutakan, sbrt. § 11.

**Til § 8**

Ásetingin samsvarar við § 5 a í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru, sum varð sett í gildið við løgtingslóg nr. 51 frá 30. apríl 2018 um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær.

Ásetingin varð sett í gildi sum ein avleiðing av broytingum í ættleiðingarlógini og ber við sær, at samlivandi, ið ættleiða saman, verða javnsett við hjún í mun til foreldramyndugleika. T.v.s., at samlivandi, ið ættleiða saman, fáa felags foreldramyndugleika. Ásetingin hevur við sær, at samlivandi, ið ættleiða saman, sostatt meinlíkt hjúnafeløgum sjálvvirkandi fáa felags foreldramyndugleika yvir barnið í sambandi við eina ættleiðing.

Samlivandi, ið stjúkbarnaættleiða eitt barn, verða stillað á sama hátt sum hjúnafelagar, tá talan er um foreldramyndugleika. T.v.s., at samlivandi, har tann eini ættleiðir barnið hjá hinum, fáa foreldramyndugleikan í felag meinlíkt hjúnafeløgum, har tann eini hjúnafelagin ættleiðir barnið hjá hinum hjúnafelaganum.

Ein stakur ættleiðari hevur sjálvvirkandi foreldramyndugleikan einsamallur. Ein samlivi ella ein hjúnafelagi, ið ættleiðir ávikavist barnið hjá sínum deyða samliva ella serbarnið hjá sínum deyða hjúnafelaga, fær sambært ásetingini foreldramyndugleikan einsamallur. Ásetingin fevnir bara um staðsetingina av foreldramyndugleika í sambandi við ættleiðing. Ásetingin forðar sostatt ikki fyri eftirfylgjandi broytingum av foreldramyndugleikanum við avtalu, avgerð ella aftaná, at ein ættleiðari er deyður, sambært teimum vanligu ásetingunum í foreldramyndugleikalógini. Ásetingin um foreldramyndugleika í sambandi við ættleiðing er galdandi fyri allar ættleiðingar, eisini ættleiðingar, ið longu eru framdar. Orsøkin til hetta er, at galdandi rættarstøða ikki broytist fyri tey børn, ið longu eru ættleidd, tí uppskotið bert er ein nágreining av § 16, stk. 1 og 2 í ættleiðingarlógini, tá ið tað snýr seg um spurningin um foreldramyndugleika.

**Til § 9**

Ásetingin samsvarar við § 6 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru, har tað er ásett, at foreldur kunnu avtala at hava felags foreldramyndugleika. Ógift, sundurlisin og fráskild foreldur kunnu avtala felags foreldramyndugleika.

Avtalan skal undirskrivast av báðum foreldrunum og skal sendast Familjufyrisitingini fyri at fáa virknað. Avtalan fær virknað, tá ið Familjufyrisitingin hevur fingið fráboðanina. Er barnið føtt uttanlands, skal tað skjalprógvast, at talan er um eitt felags barn.

Ásett er, at um  mál um foreldramyndugleika er lagt fyri rættin, skal fráboðanin latast rættinum. Avtalan fær tá virknað, tá ið rætturin hevur fingið fráboðanina. Eitt mál kann ikki verða lagt fyri rættin, fyrr enn allir kærumøguleikar eru troyttir.

*Stk. 2.* Ásett verður, at ein avtala um felags foreldramyndugleika ikki er galdandi, um hon er gjørd, áðrenn barnið er føtt, ella um avtalan er treytað ella tíðaravmarkað. Ein slík avtala kann tí heldur ikki fráboðast til Familjufyrisitingina.

Ásetingin er nýggj í lógini, men tala er um longu galdandi rætt sambært bekendtgørelse nr. 229 af 15 marts 2007 for Færøerne om forældremyndighed og samvær m.v., sum broytt við kunngerð nr. 106 frá 23. juli 2018.

**Til § 10**

Ásetingin er nýggj í lógini, men ásetir longu galdandi praksis á økinum. Staðfest verður, at felags foreldramyndugleiki heldur fram, hóast foreldrini slíta samlívið, verða sundurlisin ella skild, ella um hjúnabandið verður ógildað. Sostatt skal støða ikki takast til foreldramyndugleikan yvir felags børnum, tá ið foreldrini verða skild, uttan so at annað av foreldrunum biður um tað, sbrt. § 11.

*Stk. 2.* Ásetingin svarar til galdandi § 7 í lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásett verður, at liva foreldrini ikki saman, ella ætlar ein teirra at slíta samlívið, kann hvør teirra krevja, at felags foreldramyndugleikin skal steðga.

**Til § 11**

Ásetingin samsvarar við galdandi § 8 í lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásett verður, at foreldrini kunnu avtala, hvør teirra skal hava foreldramyndugleikan einsamallur, um tey fara hvør til sítt. Ógift, sundurlisin og fráskild foreldur kunnu gera eina slíka avtala. Avtalan skal fráboðast Familjufyrisitingini fyri at vera galdandi, og hon fær virknað, tá ið Familjufyrisitingin hevur móttikið fráboðanina.

Ásett er, at um eitt mál um foreldramyndugleika er lagt fyri rættin, kann fráboðanin latast rættinum. Avtalan fær tá virknað, tá ið rætturin hevur móttikið fráboðanina. Eitt mál kann ikki verða lagt fyri rættin, fyrr enn allir kærumøguleikar eru troyttir.

*Stk. 2 og 3.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Í samgonguskjalinum frá 14. september 2019 er ásett, at foreldramyndugleikalógin skal endurskoðast, soleiðis at børn fáa rætt til bæði mammu og pápa. Ásetingin staðfestir meginregluna um, at barnið hevur rætt til bæði foreldur og er við til at víðka um møguleikan fyri at staðfesta felags foreldramyndugleika.

Sambært galdandi lóg er tað Føroya rættur, sum tekur avgerð, um foreldrini eru ósamd um foreldramyndugleikan. Sambært galdandi lóg kann Familjufyrisitingin bara taka avger um foreldramyndugleika í sambandi við andlát, og um talan er um fyribils avgerðir. Fyribils avgerðir verða tiknar í sambandi við, at foreldramyndugleikahavin ikki kann útinna sínar skyldur og rættindi sum foreldramyndugleikahavi, og um talan er um felags foreldramyndugleiki, og vandi er fyri, at annað av foreldrunum fer at taka barnið úr landinum, áðrenn endalig avgerð um foreldramyndugleika er tikin.

Sum nakað nýtt fær Familjufyrisitingin við hesi áseting heimild at taka avgerð um felags foreldramyndugleika.

Ásetingin er galdandi fyri foreldur, sum hava felags foreldramyndugleika, og ikki sjálvi ella umvegis Familjufyrisitingina kunnu semjast um foreldramyndugleikan.

Eru foreldrini ósamd um, hvør skal hava foreldramyndugleikan, er tað meginreglan, at Familjufyristingin tekur avgerð í málinum.

Umframt, at Familjufyrisitingin kann taka avgerð um, hvør av foreldrunum skal hava foreldramyndugleikan, tá ið foreldrini eru ósamd, kann Familjufyrisitingin sambært ásetingini í uppskoti sum nakað nýtt eisini taka avgerð um, at felags foreldramyndugleiki skal halda fram.

Tekur Familjufyrisitingin avgerð um at strika felags foreldramyndugleikan, er hetta ikki til hindurs fyri, at eitt nýtt mál um striking av felags foreldramyndugleika verður lagt fyri Familjufyrisitingina t.d. um talan er um broytingar í viðurskiftunum hjá barninum ella foreldrunum. Hevur Familjufyrisitingin strikað felags foreldramyndugleika, kann tann av foreldrunum, sum ikki hevur foreldramyndugleikan, leggja mál fyri Familjufyrisitingina við áheitan um at seta felags foreldramyndugleika í gildi aftur, sbrt. § 14, stk. 1, ella biðja um at fáa foreldramyndugleikan fluttan til sín. Tað er tó sum meginregla ein treyt fyri at viðgera eina nýggja áheitan um at broyta foreldramyndugleika, at talan er um munandi broyttar umstøður.

Familjufyrisitingin kann bara strika felags foreldramyndugleika, um mett verður, at foreldrini ikki megna at samstarva um barnið við atliti at barnsins besta. Tað er ikki ein treyt, at foreldrini eru samd um alt viðvíkjandi barninum. Ósemja um einstøk viðurskifti, sum t.d. val av skúla, elvir ikki til, at felags foreldramyndugleiki verður strikaður. Avgerandi er, um foreldrini megna at handfara ósemjur teirra millum á ein slíkan hátt, at tað ikki gongur út yvir barnið. Ein avgerð um, at felags foreldramyndugleiki skal halda fram, er treytað av, at foreldrini í roynd og veru eru før fyri at hava eitt veruligt samstarv og megna at seta tørvin hjá barninum fram um teirra egnu ósemju.

Avgerðin hjá Familjufyrisitingini skal takast við atliti at barnsins besta, og Familjufyrisitingin skal leggja dent á, at avgerðin viðvirkar til at tryggja trivna og at verja barnið móti harðskapi ella øðrum, sum setir barnið í vanda, so sum at vera vitni til harðskap, sbrt. § 4. Barnið skal takast við í viðgerðini av málinum, áðrenn ein avgerð verður tikin, sbrt. § 37.

Er málið lagt fyri rættin, kann rætturin eisini sambært § 479 í rættargangslógini fáa til vega barnaserkønar váttanir og serkønar váttanir í sambandi við, at avgerð skal takast um foreldramyndugleikan.

Sambært § 5 er tað ein greið haldanaregla um, at tað er best fyri barnið, at ein av foreldrunum, sum er dømdur fyri grovan og vandamiklan persónsfarligan kriminalitet, ikki hevur foreldramyndugleikan ella lut í foreldramyndugleikanum, at barnið ikki býr hjá viðkomandi og ikki hevur samveru ella annað samband við barnið.

Talan er um grovan og vandamiklan (persónnfarligan) kriminalitet, sum verður mett at hava týdning í mun til evnini hjá foreldrunum at hava umsorgan fyri barninum

Víst verður til viðmerkingarnar til § 5.

*Stk. 3.* Avgerðin um, at felags foreldramyndugleiki skal halda fram, er treytað av, at annar av foreldrunum ynskir hetta. Ynskja bæði foreldrini, at felags foreldramyndugleiki skal halda uppat, kann Familjufyrisitingin ikki tvinga tey til at halda fram við felags foreldramyndugleika.

**Til § 12**

Ásetingin samsvarar við galdandi § 9 í lóg um foreldramyndugleika og samveru. Sambært ásetingini fáa gift, íroknað sundurlisin foreldur, sjálvvirkandi felags foreldramyndugleika aftur, um tey halda fram við ella taka upp aftur samlívið, eftir at ein teirra hevur fingið foreldramyndugleikan einsamallur, sbrt. 11. Tað er í hesum sambandi einki krav um at venda sær til Familjufyrisitingina ella annan myndugleika.

Ásetingin fevnir ikki um ógift ella fráskild foreldur. Hesi fáa ikki sjálvvirkandi felags foreldramyndugleika, hóast tey taka upp aftur samlívið, men mugu í staðin gera avtalu um felags foreldramyndugleika, sbrt. § 9.

Víst verður eisini til § 6, stk. 2 og viðmerkingarnar til hesa áseting.

**Til § 13 – flyting av foreldramyndugleika**

Ásetingin samsvarar við galdandi § 10, stk. 1 í lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásett verður, at foreldrini kunnu avtala, at foreldramyndugleikin skal flyta frá øðrum av foreldrunum til hin. Ein slík avtala skal undirskrivast av báðum foreldrunum og góðkennast av Familjufyrisitingini. Avtalan fær virknað, tá ið Familjufyrisitingin hevur fingið avtaluna.

Ein slík avtala er ikki galdandi, um hon er gjørd, áðrenn barnið er føtt, ella um avtalan er treytað ella tíðaravmarkað, sbrt. stk. 3. Ein slík avtala kann tí heldur ikki fráboðast Familjufyrisitingini.

Ásett er, at um eitt mál er lagt fyri rættin, er tað rætturin, sum kann góðkenna avtaluna. Avtalan fær virknað, tá ið rætturin hevur móttikið avtaluna. Eitt mál kann ikki verða lagt fyri rættin, fyrr enn allir kærumøguleikar eru troyttir.

*Stk. 2.* Ásetingin samsvarar við galdandi § 10, stk. 2 í lóg um foreldramyndugleika og samveru, sum varð sett í gildi við løgtingslóg nr. 51 frá 30. apríl 2018 um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær.

Ásetingin varð sett í gildi sum ein avleiðing av, at samlivandi, ið ættleiða saman, íroknað stjúkbarnaættleiðan, vórðu javnsett við hjún, tá talan er um spurningin um foreldramyndugleika.

Sambært ásetingini kunnu foreldur gera av, at onnur enn foreldrini hava foreldramyndugleikan. Foreldramyndugleikin kann verða fluttur til familju, t.d. ommu, abba, systkin hjá foreldrum, men hetta er ikki eitt krav. Foreldramyndugleikin kann eisini verða fluttur til eitt nú fosturforeldur.

Foreldramyndugleikin kann sambært ásetingini verða fluttur til eini hjún ella eitt samlivandi par. Við samlivandi er at skilja eitt par, sum hevur livað í hjúnabandslíknandi parlagi, t.v.s. hava livað saman í minsta lagi 2½ ár. Kravið um 2½ ára samlív kann tó eftir eini ítøkiligari meting frávíkjast. Um mett verður, at víkjast ikki kann frá kravinum um 2½ ára samlív, kann foreldramyndugleikin flytast til tann eina samlivan.

Ein avtala um at flyta foreldramyndugleikan skal góðkennast av Familjufyrisitingini fyri at fáa gildi. Familjufyrisitingin kann bara góðkenna avtaluna, um hon gagnar barninum.

Avtalan fær virknað, tá ið Familjufyrisitingin hevur fingið fráboðanina.

Er mál um foreldramyndugleika lagt fyri rættin, skal fráboðanin latast rættinum. Avtalan fær tá virknað, tá ið rætturin hevur móttikið fráboðanina. Eitt mál kann ikki verða lagt fyri rættin, fyrr enn allir kærumøguleikar eru troyttir.

Um foreldrini hava felags foreldramyndugleika, er tað eitt krav, at bæði foreldur eru samd um at flyta foreldramyndugleikan. Um annað av foreldrunum hevur foreldramyndugleikan einsamallur, og viðkomandi vil flyta foreldramyndugleikan til onnur enn hin av foreldrunum, og viðkomandi ikki er samdur í at flyta foreldramyndugleikan, tekur Familjufyrisitingin eina avgerð, grundað á meting um, hvat er best fyri barnið.

*Stk. 3.* Ásett verður, at ein avtala um at flyta foreldramyndugleika sbrt. stk. 1 og 2 ikki er galdandi, um hon er gjørd, áðrenn barnið er føtt, ella um avtalan er treytað ella tíðaravmarkað. Ein slík avtala kann tí heldur ikki fráboðast til Familjufyrisitingina. Harafturat er ein avtala sbrt. stk. 2 ikki galdandi, um samsýning ella gjald fyri mista arbeiðsinntøku verður veitt tí, sum hevur foreldramyndugleikan.

Ásetingin er nýggj í lógini, men tala er um longu galdandi rætt sambært bekendtgørelse nr. 229 af 15 marts 2007 for Færøerne om forældremyndighed og samvær m.v., sum broytt við kunngerð nr. 106 frá 23. juli 2018.

**Til § 14**
Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og verður sett inn í staðin fyri §§ 11 og 12 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Sambært galdandi rættarstøðu tekur rætturin við atliti at barnsins besta avgerð um, hvør av foreldrunum skal hava foreldramyndugleikan, um foreldur, sum ikki eru gift, hava livað saman í longri tíð, uttan at hava felags foreldramyndugleika, og pápin krevur at fáa foreldramyndugleikan einsamallur í sambandi við sambússlit.

Sambært galdandi rættarstøðu kann rætturin somuleiðis, tá ið serligar grundir tala fyri tí, flyta foreldramyndugleikan til hin av foreldrunum, um tað verður mett at vera best fyri barnið, nevniliga orsakað av munandi broyttum umstøðum.

Í uppskotinum verður ásett, at Familjufyrisitingin eftir áheitan frá einum av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, kann taka avgerð um, at foreldrini skulu hava felags foreldramyndugleika, ella at foreldramyndugleikin verður fluttur til viðkomandi. Ásetingin fevnir um øll føri, har annað av foreldrunum hevur foreldramyndugleikan einsamallur, bæði sambært lógini, tá ið foreldrini ikki eru gift, og sambært avtalu ella dómi.

Ásetingin er t.d. viðkomandi í førum, har foreldur, sum hava livað saman, uttan at hava felags foreldramyndugleika, fara hvørt til sítt. Ásetingin er t.d. eisini viðkomandi, eftir at foreldrini hava verið frá hvørjum ørum í rúma tíð.

Avgerandi fyri metingini av, um tað í slíkum førum er best fyri barnið, at avgerð verður tikin um felags foreldramyndugleika, er tilknýtið hjá barninum til tann av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum. Tað er ein partur av metingini, hvussu long tíð er liðin síðan sambússlitið, ella síðan avtaluna ella dómin, sum ynskist broyttur, og hvussu sambandið við barnið hevur verið í inniverandi tíðarskeiði. Atlit skal eisini takast at, um foreldramyndugleikahavin hevur framt samverusjikanu.

Tað er eisini ein partur av metingini, hvat grundarlagið er fyri, at viðkomandi, sum søkir um at fáa lut í foreldramyndugleikanum, ikki fyrr hevur havt foreldramyndugleikan ella hevur mist foreldramyndugleikan.

Í teimum førum, har foreldrini eru flutt frá hvørjum øðrum, áðrenn barnið verður føtt, og at søkt verður um lut í foreldramyndugleikanum stutt eftir, at barnið er føtt, kann dentur leggjast á, hvussu leingi foreldrini hava livað saman áðrenn sambússlitið, og um tað er sannlíkt, at tað við undanfarna samlívinum er møguligt at samstarva um barnið. Tað sama er galdandi fyri foreldur, sum ikki hava búð saman, men sum hava livað saman sum par. At enda er tað partur av metingini, um viðurskifti eru, sum tala ímóti, at foreldrini fáa felags foreldramyndugleika, t.d. harðskapur móti barninum ella øðrum í familjuni, stórir samstarvstrupulleikar, ella at umsøkjarin er óskikkaður sum foreldramyndugleikahavi, t.d. orsakað av misbrúki, álvarsligari sálarligari sjúku ella vantandi áhuga fyri barninum.

Í málum, har søkt verður um at fáa foreldramyndugleikan fluttan, skal tað í metingini av barnsins besta takast atlit at, um foreldramyndugleikahavin uttan rímiliga grund forðar hinum foreldrinum í at hava samband við barnið. Um barnið má metast at líða undir hesum, skal Familjufyrisitingin, byggja metingina á eitt framtíðarútlit, har mett verður um, hvørt hin av foreldrunum má metast at vera betur skikkað til at tryggja samstarvið rundan um barnið og tryggja, at barnið hevur samband við bæði foreldrini. Um hetta er støðan, skal Familjufyrisitingin umhugsa at flyta foreldramyndugleikan.

Ásetingin er eisini viðkomandi í førum, har umsøkjarin fyrr hevur mist foreldramyndugleikan ella lut í foreldramyndugleikanum og nú aftur vil hava lut í foreldramyndugleikanum. Í hesum førum skal dentur leggjast á grundirnar til, at viðkomandi misti foreldramyndugleikan.

Er annað av foreldrunum dømdur fyri persónsvandamiklan kriminalitet, er tað ein greið haldanaregla um, at tað er best fyri barnið, at viðkomandi ikki hevur foreldramyndugleikan ella lut í foreldramyndugleikanum,sbrt. § 5. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 5.

**Til § 15 – andlát**
Ásetingin samsvarar í stóran mun við § 13 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru og ásetir, hvør hevur foreldramyndugleikan, tá ið annað ella bæði foreldrini doyggja.

Sambært ásetingini hevur eftirsitandi einsamallur foreldramyndugleikan, um annað av foreldrunum doyr, og foreldrini høvdu felags foreldramyndugleika. Býr barnið hjá eftirsitandi, kann eingin annar søkja um at fáa foreldramyndugleikan. Hetta er tó ikki

galdandi, um eftirsitandi er atvoldin til, at hin doyr. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til stk. 4.

*Stk. 2.* Ásetingin er nærum óbroytt í mun til galdandi rættarstøðu. Um barnið ikki býr hjá eftirsitandi, kunnu onnur enn foreldur søkja um at fáa foreldramyndugleikan. Eftirsitandi hevur framíhjárætt at varðveita foreldramyndugleikan, tó treytað av, at hetta verður mett at vera tað besta fyri barnið. Um tað verður mett ikki at vera gott fyri barnið at búgva hjá tí av foreldrunum, ið er á lívi, kann Familjufyrisitingin lata foreldramyndugleikan til ein annan. Sum nakað nýtt verður sett sum treyt, at barnið skal vera knýtt at teimum, sum kunnu søkja um at fáa foreldramyndugleikan.

Tað kunnu vera støður, har eingin av teimum, sum barnið er knýtt at, er skikkaður at hava foreldramyndugleikan. Í slíkum førum verður ein professionellur foreldramyndugleikahavi settur, og tá verður sæð burtur frá kravinum um tilknýti til barnið.

Familjufyrisitingin leggur størsta dentin á, hvat er best fyri barnið. Barnið skal í slíkum føri eisini fáa høvi at bera fram hugsan sína um málið. Ynskið hjá deyða foreldrinum kann eisini fáa ein ávísan týdning, men framíhjárætturin hjá tí av foreldrunum, sum er á lívi. er týðandi, eisini hóast tann deyði sambært testamenti (barnatestamenti) hevði eitt annað ynski.

*Stk. 3.* Ásetingin samsvarar í stóran mun við § 13, stk. 2 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Familjufyrisitingin tekur avgerð um, hvør skal hava foreldramyndugleikan, um tann av foreldrunum, ið hevði einaforeldramyndugleika, doyr.

Eftirsitandi hevur framíhjárætt at fáa foreldramyndugleikan, tó treytað av, at hetta verður mett at vera tað besta fyri barnið. Verður tað ikki mett at vera gott fyri barnið at búgva hjá tí av foreldrunum, ið er á lívi, kann Familjufyrisitingin lata foreldramyndugleikan til ein annan. Sum nakað nýtt verður sett sum treyt, at barnið skal vera knýtt at teimum, sum kunnu søkja um at fáa foreldramyndugleikan.

Tað kunnu vera støður, har eingin av teimum, sum barnið er knýtt at, er skikkaður at hava foreldramyndugleikan. Í slíkum førum verður ein professionellur foreldramyndugleikahavi settur, og tá verður sæð burtur frá kravinum um tilknýti til barnið.

Familjufyrisitingin leggur størsta dentin á, hvat er best fyri barnið. Barnið skal í slíkum føri eisini fáa høvi at bera fram hugsan sína um málið. Ynskið hjá tí deyða kann eisini fáa ein ávísan týdning, men framíhjárætturin hjá tí av foreldrunum, sum er á lívi er týðandi, eisini hóast tann deyði sambært testamenti (barnatestamenti) hevði eitt annað ynski.

*Stk. 4.* Ásett verður, at um annar av foreldrunum er atvoldin til, at hin doyr, tekur Familjufyrisitingin avgerð um, hvørt eftirsitandi ella ein annar, sum barnið er knýtt at, skal hava foreldramyndugleikan. Hetta er galdandi, uttan mun til um foreldrini høvdu felags foreldramyndugleika ella ikki, og uttan mun til um barnið búði hjá eftirsitandi ella ikki.

Tað kunnu vera støður, har eingin av teimum, sum barnið er knýtt at, er skikkaður at hava foreldramyndugleikan. Í slíkum førum verður ein professionellur foreldramyndugleikahavi settur, og tá verður sæð burtur frá kravinum um tilknýti til barnið.

Tann eftirsitandi hevur í hesum førum ikki framíhjárætt til at fáa lut í foreldramyndugleikanum. Tað er Familjufyrisitingin sum tekur avgerð út frá tí, sum verður mett at vera best fyri barnið. Í málum, har annar av foreldrunum er atvoldin til, at hin doyr, skal tað í metingin av barnsins besta gjølla metast um, um hesi viðurskifti hava skatt sambandið hjá barninum við eftirsitandi á ein slíkan hátt, at tað er best fyri barið, at onkur annar fær foreldramyndugleikan. Harafturat hevur § 5 týdning í hesum sambandi, av tí at tað sambært hesi ásetingini er ein greið haldanaregla um, at tað er best fyri barnið, at tann av foreldrunum, sum er dømdur fyri grovan kriminalitet, ikki hevur foreldramyndugleikan ella lut í foreldramyndugleikanum. Sambært hesi ásetingini kann eftirsitandi bara í undantaksføri fáa lut í foreldramyndugleikanum.

*Stk. 5.* Foreldramyndugleikin kann verða fluttur til eini hjún ella eitt samlivandi par, íroknað annað av foreldrunum og hjúnafelagan ella samlivan hjá viðkomandi. Ásetingin verður víðkað til eisini at fevna um samlivandi pør, soleiðis at hon eisini er í samsvari við § 13, stk. 2 um flyting sambært avtalu.

Sambært galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru ber tað ikki til at kæra eina avgerð hjá Familjufyrisitingini um foreldramyndugleika til hægri umsitingarligan myndugleika, tá ein av foreldrunum er deyður. Sambært galdandi lóg kann málið leggjast fyri rættin mótvegis viðkomandi, sum Familjufyrisitingin hevur latið foreldramyndugleikan.

Hendan áseting verður strikað sambært hesum uppskotinum. Hetta merkir, at avgerð hjá Familjufyrisitingini um foreldramyndugleika í sambandi við, at annað ella bæði foreldrini doyggja, kann kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

Víst verður til viðmerkingarnar til § 42 um kærur.

**Til § 16**
Ásetingin snýr seg um føri, har onnur enn foreldrini hava fingið foreldramyndugleikan sambært avtalu (§ 13, stk. 2), ella har tað í sambandi við andlát er tikin avgerð um foreldramyndugleika (§ 15). Ásetingin í uppskoti gevur Familjufyrisitingini heimild at broyta eina slíka avgerð.

Avgerandi fyri broytingina er barnsins besta. Ásetingin í § 5 er eisini viðkomandi fyri avgerðir, tiknar sambært hesi ásetingini. Víst verður til viðmerkingarnar til § 5.

**Til § 17 - barnatestamenti**
Ásetingin samsvarar við § 14 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Tann, sum hevur foreldramyndugleika, kann í einum sokallaðum barnatestamenti boða frá, hvør skal hava foreldremyndugleika, um viðkomandi doyr. Ásetingin er ikki avmarkað til foreldur, men fevnir um tey, sum hava foreldramyndugleika yvir einum barni. Eftirsitandi hevur framíhjárætt at fáa foreldramyndugleikan, sbrt. § 15. Barnatestamentið er tí vegleiðandi og ikki avgerandi, tá ið Familjufyrisitingin skal taka avgerð um foreldramyndugleikan. Eitt barnatestamenti kann undirskrivast fyri notarinum, og Familjufyrisitingin skal spyrja Skiftirættin, um ein fráboðan fyriliggur í sambandi við, at ein avgerð verður tikin um foreldramyndugleika.

**Til § 18 - bústaður**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og ásetir, at Familjufyrisitingin kann taka avgerð um bústaðin hjá barninum, um foreldur, sum hava felags foreldramyndugleika, eru ósamd um, hjá hvørjum teirra barnið skal búgva.

Sambært galdandi lóg kann spurningurin um bústaðin hjá barninum bara verða gjørdur av við, at rætturin tekur avgerð um, at felags foreldramyndugleikin verður strikaður og latin øðrum av foreldrunum. Hvørki Familjufyrisitingin ella Føroya rættur hava heimild til serstakt at taka avgerð um bústaðin hjá barninum.

Sum nakað nýtt fær Familjufyrisitingin nú heimild at taka avgerð um, hvar barnið skal búgva, uttan at støða skal takast til spurningin um foreldramyndugleikan. Við hesi heimild fáa foreldrini betri møguleika fyri at varðveita felags foreldramyndugleika, av tí at bústaðurin hjá barninum ofta kann vera tað, sum ósemjan snýr seg um, tá ið foreldrini ynskja at avtaka felags foreldramyndugleika.

Ein avgerð um bústaðin hjá barninum skal altíð takast við atliti at barnsins besta, og sjónarmiðini hjá barninum skulu lýsast, áðrenn avgerð verður tikin í málinum. Dentur skal leggjast á sambandið millum barnið og foreldrini, persónligu eginleikarnar hjá foreldrunum, og hvussu barnið hevði borið seg at, um tað skuldi skift stovn, skúla v.m. Um tann av foreldrunum, sum barnið hevur búð hjá, hevur forðað hinum í at hava samveru við barnið (samverusjikana), og hetta hevur havt neiliga ávirkan á barnið, skal Familjufyrisitingin taka tað við í metingina, tá ið avgerð verður tikin.

Familjufyrisitingin skal eisini leggja upp fyri § 5. Sambært § 5 er tað ein greið haldanaregla, at tað er best fyri barnið, um ein av foreldrunum, sum er dømdur fyri grovan og vandamiklan persónsfarligan kriminalitet, ikki hevur barnið búgvandi hjá sær.

Talan er um grovan og vandamiklan (persónfarligan) kriminalitet, sum verður mettur at hava týdning tá talan er um evnini hjá foreldrunum at hava umsorgan fyri barninum.

Víst verður til viðmerkingarnar til § 5.

Ásetingin gevur ikki Familjufyrisitingini heimild at taka avgerð um deildan bústað.

Ein avtala og ein avgerð hjá Familjufyrisitingini um bústaðin hjá barninum kann fullgerast sambært kapitli 57 í rættargangslógini.

Verður mál um bústaðin hjá barninum lagt fyri rættin, kann ein dómur um bústaðin hjá barninum eisini fullgerast sbrt. kapittul 57 í rættargangslógini.

Sambært ásetingini í uppskoti kann Familjufyrisitingin taka avgerð um, at barnið kann búgva hjá einum av foreldrunum, sum býr ella ynskir at búgva uttanlands, um mett verður, at hetta er best fyri barnið. Bæði Danmark og Grønland eru at meta sum útland. Í hesum sambandi kann atlit takast at møguleikanum hjá hinum av foreldrunum, sum eisini hevur lut í foreldramyndugleikanum, at taka sær av barninum og hava umsorgan fyri barninum og fyri at varðveita sambandið við barnið, um barnið skal búgva uttanlands. Ásetingin hongur saman við § 3, stk. 3, har ásett er, at bæði foreldur skulu geva samtykki til, at barnið flytur av landinum, um foreldrini ikki eru samd um foreldramyndugleikan.

Hinvegin skal atlit eisini takast at møguleikanum hjá einum av foreldrunum at flyta í sambandi við, at viðkomandi ætlar at nema sær útbúgving, tað veri seg bæði innanlands og uttanlands. Dentur skal í hesum sambandi leggjast á, at viðkomandi hevur fingið tryggjað pláss á einum skúla ella fingið tryggjað læerupláss. Tað er sostatt ikki nokk, at viðkomandi bara hevur eina ætlan um at nema sær útbúgving uttanlands.

Ásetingin er ikki avmarkað til hægri lestur.

*Stk. 2.* Ásett verður, at Familjufyrisitingin kann broyta eina avgerð um bústaðin hjá barninum. Avgerðin verður tikin við atliti at barnsins besta. Ein umbøn um at broyta bústaðin hjá barninum kann verða avvíst, um umstøðurnar ikki eru broyttar munandi. Atlit skal í hesum sambandi eisini takast at, um ein av foreldrunum hevur framt samverusjikanu.

**Til § 19**
Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og ásetir eina skyldu til at kunna um flyting bæði innanlands og uttanlands. Danmark og Grønland eru í hesum sambandi at rokna sum útland.

Endamálið við ásetingini er at geva foreldrunum møguleika fyri at skipa fyri, hvussu sambandið við barnið skal varðveitast eftir flyting. Fráboðanarskyldan gevur eisini hinum partinum møguleika at byrja eitt mál um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum ella samveru, áðrenn flytingina. Vantandi kunning verður ikki revsað, men kann hava týdning, tá ið ein avgerð um foreldramyndugleika ella bústaðin hjá barninum skal takast. Tað er tann av foreldrunum, sum flytur, sum skal tryggja, at fráboðanarfreistin verður hildin.

Skyldan at boða hinum av foreldrunum frá er galdandi fyri tanntanntann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunum, sum hevur lut í felags foreldramyndugleika, tanntanntann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunum, sum hevur foreldramyndugleikan einsamallureinsamallureinsamallureinsamallureinsamallureinsamallur og tanntanntann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, men sum hevur samveru við barnið. Fráboðanarskyldan er galdandi, hóast einki samband er millum barnið og tanntanntann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunumtann av foreldrunum, sum barnið ikki býr hjá, t.d. tí at samvera ikki er avtalað ella ásett, ella tí at samveran er steðgað. FráboðanarskyldanFráboðanarskyldanFráboðanarskyldanFráboðanarskyldanFráboðanarskyldanFráboðanarskyldan er tó ikki galdandi, um annað avavavavavav foreldrunum hevur foreldramyndugleikan einsamallureinsamallureinsamallureinsamallureinsamallureinsamallur, og tað ongantíð hevur verið nakað samband millum barnið og hinhinhinhinhinhin, ella um einki samband hevur verið í longri tíð.

Um ein av foreldrunum ikki veit, hvar hin býr, má viðkomandi kunna seg um hetta hjá Landsfólkayvirlitinum. Er adressan ikki skrásett har, ella er talan um duldan bústað, hevur viðkomandi ikki skyldu til at gera meira fyri at fáa adressuna upplýsta. Hevur tann av foreldrunum, sum skal flyta, duldan bústað, og er samveran soleiðis skipað, at avhending og handan skal vera á einum uttanveltaðum staði, er einki krav um fráboðan, um flytingin ikki ávirkar samveruna. Tann av foreldrunum, sum annars hevur skyldu at fráboða, skal sanna, at tað ikki ber til at halda fráboðanarskylduna.

Hava foreldrini felags foreldramyndugleika, og eru tey ósamd um, hvør teirra skal hava foreldramyndugleikan einsamallur, skulu bæði geva samtykki til, at barnið fer av landinum, sbrt. § 3, stk. 3. Tá er ikki nóg mikið at kunna um flyting, sbrt. § 18.

**Til § 20 – samvera við foreldur**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Ásetingin er grundarlagið undir ásetingunum um samveru.

*Stk. 1.* Ásett verður, at barnsins samband við bæði foreldur, so vítt sum gjørligt, skal varðveitast. Her verður lagt upp fyri barnsins besta, við at staðfesta, at tað er barnið, ið hevur rætt til samveru við bæði foreldur – eisini tann, sum tað ikki býr hjá. Greinin staðfestir, at tað eru áhugamálini hjá barninum, sum vera sett í hásæti.

*Stk. 2.* Foreldrini hava felags ábyrgd av, at barnið varðveitir sambandið við tann av foreldrunum, ið barnið ikki býr hjá. Eisini verður staðfest, at bæði foreldrini hava felags ábyrgd av, at barnið verður handað og heintað til og frá samveru, umframt at tey hava felags fíggjarliga ábyrgd av ferðaútreiðslunum í sambandi við samveru. Avtala foreldur ikki, hvør av teimum skal syrgja fyri, at barnið verður heintað og handað í sambandi við samveru, er tað vanliga samveruforeldrið, sum skal syrgja fyri, at barnið verður handað til samveru, og bústaðarforeldrið, ið skal syrgja fyri, at barnið verður handað aftur, tá ið samveran endar. Útreiðslurnar í sambandi við samveru skulu eisini býtast javnt millum foreldrini. Avtala foreldur ikki, hvør teirra skal bera ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru, er tað vanliga samveruforeldrið, ið skal bera útreiðslurnar fyri, at barnið verður handað til samveru, og bústaðarforeldrið, ið skal bera ferðaútreiðslurnar fyri, at barnið verður handað aftur til bústaðarforeldrið, tá ið samveran endar.

*Stk. 3.* Ásett verður, at tann av foreldrunum, ið ikki hevur barnið búgvandi hjá sær, kann søkja um samveru. Hetta verður gjørt við at venda sær til Familjufyrisitingina. Við hesum verður eisini rættarstøða barnsins og partstøðan hjá foreldrum staðfest.

*Stk. 4.* Ásett verður, at tann av foreldrunum, ið hevur barnið búgvandi, kann taka fyrsta stig til at fáa ásetta samveru við bæði foreldur. Ásetingin er serliga ætlað í teimum førum, har lítil ella eingin samvera er frammanundan. Ásetanin av samveru skal tó altíð virða ynskið hjá samveruforeldrinum. Hetta verður ásett fyri barnsins besta, ið ikki skal noyðast at hava samveru við foreldur, ið ikki ynskir tað.

**Til § 21 - vavi og útinnan av samveru**

Ásetingin samsvarar við § 16 í verandi lóggávu. Ásett verður, at Familjufyrisitingin tekur, eftir umbøn, avgerð um vavið og útinnan av samveruni og kann áseta neyðugar treytir í hesum sambandi, og staðfest verður, at ein avgerð altíð skal takast við atliti at barnsins besta.

Tann av foreldrunum, sum barnið ikki hevur bústað hjá, kann biðja Familjufyrisitingina um at áseta samveru. Tann av foreldrunum, sum barnið hevur bústað hjá, kann eisini biðja Familjufyrisitingina um at áseta samveru, um eingin ella avmarkað samvera er frammanundan. Familjufyrisitingin kann tó bert áseta samveru í tann mun, samveruforeldur ynskir hetta. Samvera er ikki tengd at, hvør hevur foreldramyndugleikan.

Hava foreldrini felags foreldramyndugleika verður kravt, at tey eru samd um, hvar barnið skal búgva, fyri at Familjufyrisitingin kann áseta vavið av samveruni.

*Stk. 1.* Ásett verður, at búgva foreldur at einum barni ikki saman, hevur barnið rætt til samveru við tann av foreldrunum, sum tað ikki býr hjá.

Høvuðsendamálið við at áseta samveru er, at barnið varðveitir samband við tann av foreldrunum, sum barnið ikki vanliga býr hjá, tí rætturin hjá barninum er at hava samband við bæði foreldur, og tað er oftast eisini í samsvari við tað, sum er best fyri barnið.

Í flestu førum avtala foreldur sjálvi, hvussu samveran skal skipast. Men semjast foreldur ikki um samveruna, ger § 20 greitt, at tey kunnu heita á Familjufyrisitingina, um at taka avgerð um vavið og útinnan av samveruni. Familjufyrisitingin kann eisini áseta neyðugar treytir í sambandi við samveruna.

Eru foreldrini samd um, hvussu samveran skal skipast, er ikki neyðugt hjá teimum at seta seg í samband við Familjufyrisitingina. Ein slík avtala millum foreldrini kann nýtast at tvingsilsfremja samveruna við hjálp frá fútarættinum sambært kapitli 57 í rættargangslógini.

§ 20, stk. 1 ásetir eisini, at Familjufyrisitingin eisini tekur avgerð um vavið á samveruni. Samvera skal vera í tí vavi, sum er best fyri einstaka barnið, og verður ásett út frá eini ítøkiligari meting av støðuni hjá einstøku familjuni.

Avgerðir verða tiknar út frá, hvat Familjufyrisitingin í hvørjum einstøkum føri metir vera best fyri barnið. Familjufyrisitingin skal ikki áseta meira samveru enn ta samveru, ið samveruforeldur ynskir.

Familjufyrisitingin kann taka fyribils avgerð um samveru, ímeðan eitt mál um foreldramyndugleika ella samveru er til viðgerðar. Ein fyribils avgerð er galdandi, inntil ein endalig avgerð um samveru er tikin. Sí nærri áseting í grein 33 í lógini.

Tá ið Familjufyrisitingin skal meta um, hvør samvera er best fyri barnið, verður dentur lagdur á ymisk viðurskifti – millum annað:

- Aldur og búnastøði hjá barninum
- Sjónarmiðið hjá barninum – alt eftir aldri og búnaðarstøði
- Gerandisdagin hjá barninum, íroknað frítíðarvirksemi
- Sambandið higartil millum barnið og samveruforeldrið
- Samstarvsevnini hjá foreldrunum
- Persónlig- og arbeiðsviðurskifti hjá foreldrunum
- Frástøða millum bústaðirnar hjá foreldrunum
- Sambandið hjá barninum við systkin, íroknað hálv- og stjúksystkin
- Umframt onnur viðkomandi viðurskifti
-

Samstarvstruppulleikar millum foreldrini kunnu viga tungt í sambandi við eina avgerð um samveru.

Er talan um nýføðingar og smá børn skal dentur leggjast á menningina hjá barninum og á at samvera verður ásett við einum slíkum smidleika, at lagt verður upp fyri tørvinum hjá

barninum at hava samband við samveruforeldrið. Hetta kann t.d. vera gjørt við at áseta stuttar samverur við stuttummillumbilum.

Tá talan er um nýføðingar og smábørn er størri tørvur á at taka barnaserkøn við í málið.

Um talan er um samveru í frítíð og høgtíðum, verður samvera ásett við støði í einari ítøkiligari meting av einstøku viðurskiftunum. Sum dømi kann frítíðarsamvera verða ásett eftir hesum leisti:

- Summarfrítíð í 3-4 vikur.
- Nakrar dagar í heystfrítíðini, ella alla heystfrítíðina annað hvørt ár.
- Nakrar dagar á páskum, ella øll páskini annað hvørt ár.
- Um jólini, soleiðis at samvera er jólaaftan annað hvørt ár. Dentur verður lagdur á mentan og siðvenju.
- Nýggjár annað hvørt ár.

Eisini kann samvera ásetast til aðrar mentanarligar ella átrúnaligar hendingar.

Vanliga verður frítíðarsamvera ikki ásett við náttarvisti, um samveran annars ikki fevnir um, at barnið liggur nátt. Í staðin kann samvera uttan náttarvist verða ásett fleiri dagar á rað.

Foreldur skulu halda galdandi avtalur um samveru. Hevur Familjufyrisitingin ásett samveru ávísa tíð, og foreldur, sum hevur barnið búgvandi, ikki vil lata barnið til samveru, kann samveruforeldur fáa hjálp í fútarættinum at fremja samveruna. Hetta er eisini galdandi, um foreldrini sjálvi hava avtalað. Víst verður til kapittul 57 í rættargangslógini.

Familjufyrisitingin kann taka barn við í viðgerðina av samverumáli, soleiðis at barnsins sjónarmið og hugsan verður lýst. Nærri reglur eru um hetta í grein § 37 í lógini.

Familjufyrisitingin tekur avgerð um vavið av samveru.

Higartil hevur verið siðvenja, at Familjufyrisitingin í mesta lagi ásetir eina 6/8-skipan. Tað vil siga, at barnið er 6 dagar hjá samveruforeldrinum og 8 dagar hjá bústaðarforeldrinum.

Hendan siðvenjan verður nú broytt soleiðis, at Familjufyrisitingin kann taka avgerð um eina javnbýtisskipan, soleiðis at barnið skal vera líka nógvar dagar hjá báðum foreldrum.

Hava foreldur áður avtalað eina javnbýtisskipan, er vanligt, at Familjufyrisitingin ásetir samveru við støði í javnbýtisskipanini.

Ein javnbýtisskipan er vanliga treytað av, at foreldrini antin áður hava havt eina slíka skipan, ella at søkt verður um áseting av samveru beint eftir samlívsslit, umframt at foreldrini búgva tætt við hvørt annað, og at gerandisdagurin hjá barninum ikki verður stórvegis ávirkaður av, um tað er hjá tí eina ella hinum av foreldrunum. Ein javnbýtisskipan kann sostatt ikki verða nýtt, um tað merkir, at barnið skal ganga á tveimum ymiskum stovnum ella í tveimum ymiskum skúlum. Ein javnbýtisskipan er eisini treytað av, at foreldrini megna at samstarva um barnið.

Familjufyrisitingin tekur eisini avgerð um útinnan av samveru, t.d. um samveran skal vera undir eftirliti, og undir hvørjum treytum samvera skal ásetast.

Samvera undir eftirliti merkir, at samvera millum barn og foreldur, sum barnið ikki býr saman við, verður eygleidd, t.d. av einum barnaserkønum ráðgeva, øðrum fakpersóni ella einum familjulimi.

Samvera undir eftirliti verður brúkt í støðum, tá Familjufyrisitingin ikki metir, at aðrir møguleikar eru at áseta samveru millum barn og foreldur, sum barnið ikki býr hjá, ella at foreldur avtala, at samvera skal vera undir eftirliti.

Nógvar ymsar orsøkir kunnu vera til, at Familjufyrisitingin kann taka avgerð um, at foreldur í eitt tíðarskeið er undir eftirliti í sambandi við samveru. Tað kunnu t.d. vera føri, har sambandið millum barn og foreldur hevur verið slitið í longri tíð, ella tá barn og foreldur ikki kennast nóg væl.

Samvera undir eftirliti kann eisini setast í verk, um nógv stríð er millum foreldur, og tey hava torført við at samstarva um barnið. Eisini kann samvera undir eftirlitið setast í verk, um illgruni er um harðskap ella misnýtslu.

Sum er, er talan um 4 ymisk sløg av eftirlitið, ið Familjufyrisitingin brúkar:

- **Eygleidd samvera** verður vanliga brúkt, tá ið tørvur er á fleiri upplýsingum um barnið og samveruforeldrið. Til dømis sum liður í einari barnaserkønari kanning. Í slíkum føri myndar eygleiðingin grundarlag undir einari meting av, hvussu samveran skal skipast frameftir. Ein avgerð um eygleidda samveru er sostatt liður í at lýsa málið og er ikki ein avgerð um, hvørt samvera skal verða ella ikki skal verða frameftir.
- **Vard samvera** merkir, at samveran er undir støðugum eftirliti. Hesin háttur verður oftast brúktur, um barnið ikki hevur havt samband við samveruforeldrið í langa tíð, ella um óvissa er um samveruforeldrið kann taka sær av barninum, t.d. um samveruforeldrið er misnýtari, ella illgruni er um misnýtslu. Vard samvera verður eisini brúkt í førum, har illgruni er um ópassandi atferð, ella um bústaðarforeldrið ber ótta fyri, at burturflyting, og vandin fyri burturflyting ikki kann vísast aftur. Vard samvera kann brúkast, um Familjufyrisitingin metir, at eingir aðrir møguleikar eru fyri samveru.
- **Stuðlað samvera** verður t.d. brúkt um samveruforeldrið er ungt, óbúgvið ella sera óvant at ansa eftir barninum, ella um barnið er heilt lítið ella ber brek. Stuðlað samvera hevur til endamáls at tryggja eina stigvísa tilvenjing, og møguliga eisini at læra samveruforeldrið at vera saman við barninum. Hendan samveran kann eisini brúkast í førum, har ósemjustøðið er høgt millum foreldur og tørvur er á einum uttanveltaðum persóni, sum kann vera við til at heinta og handa barnið saman við samveruforeldrunum ella at standa fyri at fara eftir og við barninum í sambandi við samveru.
- **Hjáverusamvera** verður millum annað brúkt, um tørvur “bert” er á at hava uttanveltaðan persón hjástaddan undir samveruni. Til dømis í førum har ósemjustøðið er serliga høgt millum foreldur, og bústaðarforeldrið av hesi orsøk er ímóti samveruni. Í slíkum førum kann tað vera ein hjálp, fyri at tryggja sambandið millum barnið og samveruforeldrið, og ein háttur at seta gongd í samveruna. Hjáverusamvera kann eisini brúkast í førum, har tað verður mett best fyri barnið at hava samband við samveruforeldrið, men bert á kennskapsstøði. Samband á kennskapsstøði er samvera við lutfalsligum longum tíðarbili ímillum og í stutta tíð. Hetta, til dømis um samveruforeldrið situr í fongsli. Hjáverusamvera kann brúkast í støðum, har tørvur er

á at fáa heintan og handan av barninum at rigga, og har samveruforeldrið heintar barnið á neutralum staði.

Familjufyrisitingin kann áseta neyðugar treytir í sambandi við ásetan av samveru. Familjufyrisitingin kann eitt nú taka avgerð um varðveitslu av passi, og at samveruforeldrið ikki skal vera ávirkað av alkoholi ella dusandi evnum undir samveruni.

Ásetingin um varðveitslu av passi er treytað av, at tað er ein ítøkiligur og grundaður illgruni um, at samveruforeldrið fer av landinum við barninum. Eru treytir settar um varðveitslu av passi, skal passið latast Familjufyrisitingini, áðrenn barnið verður avhendað.

Um ein av foreldrunum er dømdur fyri grov brotsverk, sambært § 5, talar hetta harðliga ímóti, at avgerð verður tikin um, at foreldrið kann hava samveru við barnið. Víkjast kann frá hesum, um hetta út frá einari væl grundaðari og ítøkiligari meting verður mett at vera best fyri barnið.

Barnið skal somuleiðis altíð beinleiðis ella óbeinleiðis takast upp á ráð í sambandi við samveru, soleiðis at sjónarmiðini hjá barninum verða lýst, sambært § 38.

*Stk. 2.* Ásett verður, at Familjufyrisitingin til eina og hvørja tíð kann broyta eina avtalu ella avgerð um samveru, um mett verður, at broytingin er best fyri barnið, serliga tá talan er um týðandi broytingar í umstøðunum.

Foreldur kunnu til eina og hvørja tíð avtala at broyta áður avtalaða ella ásetta samveru. Familjufyrisitingin kann tó seta nýggju samveruavtaluna í nýtt samveruskjal við tvingsilsfulnaði.

Eru foreldrini ósamd um eina møguliga broyting, kann Familjufyrisitingin eftir umsókn taka avgerð um at broyta eina avtalu ella avgerð um samveru, um broytingin verður mett best fyri barnið, ella broytingin er grundað í munandi broytt viðurskifti. Familjufyrisitingin ger tó vanliga bert broytingar í yvirskipaðu samveruni, tá avgerð skal takast um, hvat er best fyri barnið.

Sum meginregla skal Familjufyrisitingin ikki taka avgerð um at broyta samveruna, tá ið broytingin ikki snýr seg um yvirskipaðu karmarnar fyri samveru, men t.d. snýr seg um at leingja ella flyta samveruna orsakað av føðingardegi í familjuni. Slíkar broytingar mugu foreldur sjálvi avtala sínámillum. Verða foreldur ikki samd, skal avgerðin um samveru, ella avtalan um samveru, fylgjast.

Familjufyrisitingin kann nokta at viðgera eina umsókn um at broyta samveru, um umsøkjari ikki vísir á munandi broytt viðurskifti, ið tala fyri at broyta samveruna við atliti at barnsins besta.

*Stk. 3.* Ásett verður, at Familjufyrisitingin kann nokta at áseta samveru, um Familjufyrisitingin metir at hetta er best fyri barnið.

Hóast lógin leggur til grund, at barnið hevur rætt til at hava samveru við bæði foreldur, er tað í summum førum neyðugt at nokta samveru við atliti at barnsins besta. Ásetanin gevur tí heimild at nokta samveru ella steðga samveru. Ein avgerð í hesum sambandi skal altíð takast við atliti at, hvat er best fyri barnið. Afturat tí skal Familjufyrisitingin tryggja, at avgerðin um samveru er við til at tryggja barninum trivnað, og barnið ikki verður fyri harðskapi, ella aðrari

viðgerð, ið útsetir barnið fyri skaða ella vanda. Barnið skal heldur ikki vera vitni til harðskap, sambært § 2.

Um samvera verður noktað, kann samveruforeldrið søkja um samveru av nýggjum, tá umstøðurnar, sum grundaðu, at samvera varð noktað, eru broyttar.

Fyri at verja barnið kann tað koma upp á tal at taka avgerð um at avmarka samveruna við barnið, ímeðan eitt mál verður kannað.

Dømir um, nær Familjufyrisitingin kann nokta at áseta samveru, ella at seta samveru úr gildi, eru:

- Langtíðarskilnaður millum barn og samveruforeldur.
- Óstøðufesti hjá samveruforeldri.
- Høgt ósemjustøði millum foreldur.
- Tilburðir, har samveruforeldur hevur nýtt harðskap.
- Sambært ynskinum frá barni.

Listin er ikki lýstur út í æsir.

**Til § 22 – samvera við onnur enn foreldur**
Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og ásetir meginregluna fyri samveru við onnur enn foreldrini. Familjufyrisitingin hevur bert havt møguleika at ásett samveru við foreldur – ikki onnur í familjuni. Eitt barn hevur heldur ikki kunna søkt um ásetan av samveru.

*Stk. 1.* Ásett verður, at tað nú verður gjørligt hjá øðrum enn foreldrum at søkja um samveru. Ásetingin fevnir um støður, har annað ella bæði foreldur eru deyð, ella annað av foreldrunum er ókent.

Ásetingin er serliga ætlað teimum, sum barnið er í ætt við, t.d. ommum, abbum, systkjum, hálvsystkjum, systkjum hjá foreldrunum ella øðrum næstingum, sum barnið er knýtt at. Tey, sum eru í ætt við tann av foreldrunum, sum er á lívið, kunnu sostatt sum meginregla ikki søkja um samveru.

Tað er týdningarmikið, at barnið er knýtt at umsøkjaranum. Tað er tí ikki nokk at vera næsti fyri at søkja um samveru. Tað skal kunna ávísast tilknýti millum barn og umsøkjaran, og avgerðin skal metast út frá, hvat fyri samband er best fyri barnið at varðveita.

Talan kann eisini verða um onnur uttan ættarligt samband við barnið, sum tað er knýtt at. Við í metingini av, um ein persónur kann metast at vera knýttur at barninum, er sosiala tilknýtið hjá barninum til persónin. Um barnið til dømis hevur eitt tætt samband við fyrrverandi stjúkbarnaforeldur, stjúkbarnasystkin ella fosturforeldur, kunnu tey eisini søkja um samveru sambært § 21 í lógini.

Samveran sambært hesi grein er sum oftast styttri í vavi og títtleika, enn ásett samvera við foreldur. Sum dømi kann nevnast ein dag, ella eitt vikuskiftið um mánaðin.
Umstøður kunnu tó gera, at mett verður, at tað er best fyri barnið, at samveran hevur sama vavi og títtleika sum vanlig samvera við ein av foreldrunum, t.d. tá talan er um sosial foreldur. Talan er her um sosial foreldur, ið hava sera tætt samband við barnið, hava verið umsorganarpersónar hjá barninum, og annars hava sama tilknýti til barnið, sum um tey vóru

foreldur at barninum. Familjufyrisitingin kann í slíkum førum áseta samveru við onnur enn foreldur.

Ein umsókn um samveru eftir § 21 í lógini kann einans játtast, um barnið er eldri enn 18 ár.

Avgerðin hjá Familjufyrisitingini skal altíð takast við atliti at barnsins besta.

*Stk. 2.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Ásett verður, at í teimum førum, har barnið sjáldan hevur samveru við tann av foreldrunum, ið tað ikki býr hjá, kann Familjufyrisitingin, eftir áheitan, áseta samveru við onnur enn foreldrini, ið barnið er knýtt at. Her er serliga talan um børn, ið t.d. hava lítið og einki samband við tann av foreldrunum, sum barnið ikki býr hjá, men ommu og abba, næstingar, ella onnur, ið barnið er knýtt at, og sum eru áhugað í samveru við barnið. Viðkomandi, ið ynskir samveru, kann heita á Familjufyrisitingina um at áseta samveru við viðkomandi. Atlit skal í hvørjum einstøkum føri takast at, hvat er best fyri barnið.

**Til § 23 – ættleidd børn**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og skipar samveru ella annað samband millum eitt barn, sum er ættleitt, og uppruna skyldfólk. Annað samband fevnir um samband umvegis telefon, bræv ella aðrar samskiftismiðlar.

Hægstirættur hevur í einum dómi frá 4. februar 2019 (U.2019.1565) staðfest, at tað valla er sambærligt við Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, um samvera ella annað samband eftir ættleiðing bara er ein møguleiki í heilt serligum førum. Atgongdin til samveru eftir ættleiðing er sostatt neyðug fyri at tryggja, at lóggávan er í samsvari við EMRS.

Ein avgerð um samveru ella annað samband sambært ásetingini í uppskoti skal takast við atliti at barnsins besta. Ein avgerð um samveru skal vera við til at tryggja trivnaði hjá barninum og at verja barnið móti harðskapi ella øðrum, sum setir barnið í vanda, so sum at vera vitni til harðskap, sbrt. § 2. Harafturat hevur § 5 týdning í hesum sambandi, av tí at tað sambært hesi ásetingini er ein greið haldanaregla um, at tað er best fyri barnið, at tað ikki hevur samveru ella annað samband við tann, sum er dømdur fyri grovan kriminalitet. Víst verður til viðmerkingarnar til § 5.

Í metingini av barnsins besta er neyðugt við eini heildarmeting av stutttíðar og langtíðar støðuni hjá barninum. Tað er rætturin hjá barninum til samveru, sum er avgerandi sambært ásetingini, og ikki rætturin hjá uppruna skyldfólkunum.

Í metingini av barnsins besta skal atlit takast at serligu støðuni hjá barninum eftir eina ættleiðing, har samband skal knýtast millum barnið og ættleiðingarfamiljuna, og har barnið hevur tørv á einum støðugum og samanhangandi gerandisdegi. Orsøkirnar til, at avgerð er tikin um ættleiðing uttan samtykki, t.d. manglandi foreldraførleiki er eisini partur av metingini.

Um fleiri søkja um samveru ella annað samband, skal hetta metast í mun til barnsins besta, av tí at hetta kann hava týdning fyri møguleikan at skapa ein støðugan gerandisdag fyri barnið. Tað kann t.d. vera best fyri barnið at áseta samveru ella annað samband, um tað undan ættleiðingini hevur verið eitt týdningarmikið og jaligt samband millum barnið og uppruna skyldfólk, og mett verður, at hetta sambandið eisini frameftir er gott fyri barnið.

Ásetingin fevnir um allar ættleiðingar, og serliga har tað hevur verið støðugt samband millum barnið og umsøkjaran undan ættleiðingini. Høvuðs virkisøkið er ættleiðingarmál, har eitt størri barn undan ættleiðingini hevur verið sett heiman og hevur havt støðuga samveru ella annað samband við foreldrini. Ásetingin gevur eisini møguleika fyri at áseta samveru millum eitt smábarn og uppruna skyldfólk, hóast einki samband hevur verið undan ættleiðingini. Ásetingin fevnir eisini um støður, har tað hvørki undan ella eftir ættleiðingina hevur verið samband millum barnið og umsøkjaran, men har eitt størri barn t.d. hevur tørv á ella vil hava samband við uppruna skyldfólk, og eitt slíkt samband verður mett at vera best fyri barnið.

Ásetingin er fyrst og fremst ætlað uppruna foreldrunum, og ein møgulig samvera er meira avmarkað í títtleika og vavi enn samveran, sum annars vanliga verður nýtt og ásett. Tað kunnu vera støður, har barnið ikki hevur nakað tætt samband við foreldrini, men harafturímóti hevur eitt tætt samband við ommur og abbar ella systkini hjá foreldrunum. Í slíkum førum kann tað vera týdningarmikið at varðveita hetta sambandið eftir eina ættleiðing. Endamálið við ásetingini er at varðveita lívfrøðiliga sambandið, og ásetingin fevnir tí bara um skyldfólk.

Ein umbøn um samveru ella annað samband verður latin Familjufyrisitingini, sum tekur avgerð í málinum. Tað er ikki ein treyt fyri rættinum at søkja um samveru ella annað samband, at tey, sum ættleiða, seta seg upp í móti tí. Ein avgerð kann sostatt takast hóast semju um samband, um tað er gagnligt fyri partarnar – og harvið eitt atlit at barnsins besta, at ein avgerð verður tikin (samværsresolution).

Avgerðin kann bara fullgerast við at nýta tvingsilsbøtur, sbrt. § 593, stk. 2, 3. pkt. í rættargangslógini.

**Til § 24 - viðbótarsamvera**

*Stk. 1.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Ásett verður, at samveruforeldrið hevur rætt til sjálvvirkandi viðbótarsamveru fyri mista samveru, um bústaðarforeldur hevur forðað samveru uttan haldgóða orsøk. Tað er ein treyt fyri at fáa viðbótarsamveru, at samveruforeldrið beinanvegin eftir, at samveran ikki verður hildin, gevur bústaðarforeldrinum boð um, at viðkomandi vil hava viðbótarsamveru.

Endamálið við ásetingin er at varðveita sambandið millum barnið og samveruforeldrið og at forða fyri, at bústaðarforeldrið avlýsir avtalaða samveru.

Samveruforeldrið hevur rætt til viðbótarsamveru uttan mun til orsøkina til, at samveran verður avlýst, eisini um barnið verður sjúkt.

Ásetingin um viðbótarsamveru er galdandi, tá ið foreldrini sjálvi hava gjørt avtalu um samveru, og tá ið Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð um at áseta samveru. Ásetingin hevur tó bara praktiskan týdning í støðum, tá ið foreldrini ikki sjálvi kunnu avtala broytingar í samveru. Foreldrini kunnu sjálvi avtala broytingar um samveru eftir tørvi.

Um samveruforeldrið vil hava viðbótarsamveru, skal viðkomandi sjálvt boða bústaðarforeldrinum frá hesum beinanvegin eftir, at samveran ikki verður hildin. Samveruforeldrið skal sostatt ikki søkja um viðbótarsamveru hjá Familjufyrisitingini.

Familjufyrisitingin kann ikki hjálpa við at fremja viðbótarsamveru. Um viðbótarsamvera ikki verður hildin, og um samveruforeldrið vil fremja viðbótarsamveru, skal bústaðarforeldrið venda sær til rættin.

*Stk. 2-3.* Ásett verður, at samveruforeldrið bara hevur rætt til viðbótarsamveru í sambandi við støðuga samveru og ikki í einstøkum samveruavtalum, so sum samveru í feriu og halgidøgum ella samveru undir eftirliti.

*Stk. 4.* Ásett verður, at reglurnar um rættin til viðbótarsamveru eisini eru galdandi, um viðbótarsamveran ikki verður framd.

*Stk. 5.* Ásett verður, at avgerðir um samveru skulu hava eina áseting um viðbótarsamveru. Talan er um avgerðir, sum verða tiknar á Familjufyrisitingini sambært hesi lóg. Familjufyrisitingin hevur skyldu at vegleiða foreldrum, sum gera avtalu um samveru, um rættin hjá samveruforeldrinum til viðbótarsamveru og treytirnar í hesum sambandi.

**Til § 25 – annað samband**

*Stk. 1.* Ásetingin samsvarar við § 17 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru, tó soleiðis, at ásetingin í uppskoti verður nútímansgjørd. Ásetingin gevur Familjufyrisitingini møguleika at áseta annað samband enn vanliga samveru.

Ásett verður, at Familjufyrisitingin í serligum førum kann taka avgerð um, at tann av foreldrunum, ið ikki hevur barnið búgvandi, kann hava samband við barnið umvegis telefon, bræv ella aðrar talgildar samskiftismiðlar, so sum Skype, Facetime og annað líknandi. Ásetingin er ikki lýst út í æsir.

Ein serlig støða skal liggja til grund fyri, at Familjufyrisitingin tekur avgerð um annað samband. Til dømis, um møguleiki ikki er fyri vanligari samveru, ella um samveran er serliga avmarkað, orsakað av t.d. arbeiðsstøðuni hjá samveruforeldri (t.d. sjófólk). Ásetingin kann eisini verða brúkt sum eitt amboð í sambandi við, at samveruforeldrið skal fáa tættari tilknýtið til barnið við tí endamálið veruliga at møtast við barninum.

Samvera sambært § 23 er tó altíð serlig. Best er veruliga at møtast við barninum.

Avgerðir sambært § 23 skulu altíð takast við atliti at barnsins besta. Familjufyrisitingin tekur avgerð um hetta bæði í sambandi við samveru, og tá eingin samvera er ásett.

Sambært § 37 skal barnið eisini altíð takast við upp á ráð, so barnið og tess sjónarmið eisini verða tikin við í metingina.

*Stk. 2.* Ásett verður, at umbøn um annað samband kann berast fram av tí av foreldrunum, sum ikki hevur barnið búgvandi, og barnsins næstum. Ásetingarnar í § 21 um samveru skulu tó vera loknar.

**Til § 26 – kunning**

Ásetingin byggir á § 17 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru, men nágreinar treytirnar fyri at fáa atgongd til upplýsingar um barnið.

Í høvuðsheitum skal tann av foreldrunum, sum hevur barnið búgvandi, vanliga kunnað hin, um nakað nýtt er úr gerandisdegnum hjá barninum.

Sambært galdandi áseting hevur tann av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, ikki rætt til at luttaka í foreldrasamrøðum um barnið, ella rætt til at fáa innlit í eitt mál um barnið – uttan so, at hin gevur hinum av foreldrunum loyvi til tess.

*Stk. 1* Ásett verður, at tann av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, hevur rætt til kunning um viðurskifti hjá barninum frá skúla, dagstovni, almanna- og heilsuverki, umframt privatum sjúkrahúsi og virkandi læknum og tannlæknum.

Tann av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, skal sjálvur biðja um upplýsingarnar.

Ásett verður eisini, at tann av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, hevur rætt til at fáa handað skjøl um viðurskifti um barnið. Viðkomandi kann ikki krevja, at upplýsingarnar verða útvegaðar skrivliga, uttan so at talan er um skjøl um viðurskifti hjá barninum í skúlanum ella dagstovninum, sum frammanundan eru skrivlig.

Í staðin fyri rættin til at luttaka í samrøðum um barnið hevur viðkomandi rætt til kunning. Tað vil siga, at tann av foreldrunum, ið ikki hevur foreldramyndugleikan, hevur rætt til at fáa kunning um støðuna hjá barninum frá m.ø. hesum støðum:

- Skúla (fólkaskúla, frískúla, miðnámsskúla, ungdómsútbúgving)
- Ansingarstovni (vøggustovu, barnagarði, frítíðarskúla, dagrøkt)
- Almennum myndugleikum (barnaverndartænastuni, sernámi., stovnum, heilsurøkt)
- Heilsumyndugleikum (sjúkrahúsi)
- Privatum sjúkrahúsi
- Privat starvandi læknum (vanligum serlæknum)
- Tannlæknum

Listin er ikki lýstir út í æsir.

Tað er ikki eitt krav, at talan er um almennar myndugleikar, har fyrisitingarlógin er galdandi. Privat starvandi sálarfrøðingar eru tó ikki fevndir av ásetingini.

Viðkomandi kann fáa upplýsingar um viðurskiftini hjá barninum – men ikki um viðurskiftini hjá hinum av foreldrunum. Kunningin kann til dømis fevna um:

- Skúla: fakliga menning, áskoðan, aðra menning, trivnað, trupulleikar o.a.
- Ansingarstovnar: trivnað, menning o.a.
- Almennar myndugleikar: hjálpartiltøk o.a.
- Heilsumyndugleikar: heilsustøðu, grundir til innleggjan, viðgerð o.a.

*Stk. 3.* Myndugleikin, stovnurin, skúlin, dagstovnurin, læknin ella tannlæknin kunnu nokta at útflýggja upplýsingar, um hetta verður mett at skaða barnið. Eisini ger greinin greitt, at upplýsingar um tann av foreldrunum, sum hevur foreldramyndugleikan, umframt tess samband við barnið, skulu ikki útflýggjast.

Noktar skúlin, stovnurin ella annar myndugleiki at geva viðkomandi ítøkiligar upplýsingar, skal hetta gerast við avgerð – hendan avgerð kann kærast eftir galdandi reglum hjá avvarðandi myndugleika um rætt til kæru. Eru ongar reglur um rætt til kæru yvir avgerðir hjá stovninum ella myndugleikanum, kann ein ikki kæra.

*Stk. 4.* Ásetingin samsvarar við § 18, stk. 2 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásett verður, at Familjufyrisitingin í serligum førum kann noktað hinum av foreldrunum rætt til kunning eftir stk. 1 og 2. Avgerðin hevur virknað frá tí, at myndugleikin fær fráboðan um avgerðina. Hendan avgerð skal takast eftir umbøn frá tí, sum hevur foreldramyndugleika, ella einum av teimum í stk. 1 nevndu myndugleikum.

**Til § 27 – umsorganaryvirtikin børn**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Endamálið við ásetingini er at avtaka heimildina hjá Familjufyrisitingini at áseta samveru ella annað samband, tá talan er um børn, ið eru umsorganaryvirtikin, við ella uttan samtykki.

Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur sambært § 22 í barnaverndarlógini heimild at taka avgerð um samveru millum umsorganaryvirtikin børn og teirra foreldur og onnur enn foreldrini.

Familjufyrisitingin hevur í løtuni eisini heimild at áseta samveru og/ella annað samband millum børn og foreldur, hóast børn eru umsorganaryvirtikin.

Talan er sostatt um tvímálsræði, tá ið talan er um umsorganaryvirtikin børn.

Mett verður, at tað er óneyðugt og skapar óneyðugan iva um galdandi rættarstøðu við tvímálsræði. Somuleiðis verður mett, at tað er meira nærliggjandi, at tað er Høvuðsbarnaverndarnevndin, og ikki Familjufyrisitingin, sum ásetir samveru, tá talan er um umsorganaryvirtikin børn.

Viðmerkjast kann, at hóast eitt barn verður umsorganaryvirtikið, varðveita foreldrini antin eina- ella felags foreldramyndugleika. Tað merkir, at tann, sum hevur foreldramyndugleikan, framhaldandi skal geva samtykki til týðandi avgerðir um barnið, t.d. val av skúla, pass, týðandi læknalig viðgerð, flyting uttanlands v.m., uttan so, at tað er gjørt av í serlóggávu, at onkur annar kann taka slíka týðandi avgerð.

**Til § 28 – avgerðir í sambandi við ferðing uttanlands**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og hevur til endamáls at gera greitt, hvør av foreldrunum kann taka barnið við uttanlands.

Hava foreldur felags foreldramyndugleika, kunnu bæði foreldur ferðast við barninum uttanlands, uttan at tað krevur avgerð frá Familjufyrisitingini ella samtykki frá hinum. Hetta er tó ikki galdandi, um foreldur eru ósamd um foreldramyndugleikan, ella um Familjufyrisitingin hevur tikið avgerð at avmarka rættin til samveru við barnið uttanlands, og samtykki tí krevst frá hinum av foreldrunum.

Hava foreldrini felags foreldramyndugleka og eru ósamd um foreldramyndugleikan, kann Familjufyrisitingin taka avgerð um, at annar av foreldrunum ferðast uttanlands við barninum í

eitt stutt tíðarskeið. Í hesum sambandi er endamálið við uppihaldinum avgerandi fyri, hvussu leingi viðkomandi kann ferðast við barninum. Danmark og Grønland skal í hesum sambandi metast sum útland.

Hevur bústaðarforeldið einsamalt foreldramyndugleika, gevur ein avgerð hjá Familjufyrisitingini í sambandi við samveru samveruforeldrinum bert rætt til samveru í Føroyum, danska kongaríkinum og hinum Norðurlondunum.

Foreldur kunnu sjálvi avtala, at barnið kann ferðast við samveruforeldrinum uttan fyri Norðurlond.

Verða foreldur ikki samd, kann samveruforeldrið søkja Familjufyrisitingina um samveru uttanlands. Familjufyrisitingin metir, um tað er gott fyri barnið at fara við samveruforeldrinum uttanlands. Í nógvum førum ger Familjufyrisitingin av, um barnið sleppur at halda frítíð uttanlands ella at vitja familju uttanlands.

**Til § 29 – Ferðing og ferðaútreiðslur í sambandi við samveru**

*Stk. 1.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Ásett verður, at bæði foreldur hava ábyrgd av, at samvera kann fremjast. Foreldrini avtala sjálvi, hvussu tey skipa ferðingina í sambandi við samveru, og foreldrini skulu deilast um ferðaútreiðslurnar í sambandi við samveru.

*Stk. 2.* Ásett verður, at Familjufyrisitingin í heilt serligum førum kann taka avgerð um býti av ferðaútreiðslum í sambandi við samveru, um foreldrini eru ósamd um hetta.

Ein slík avgerð skal takast út frá einari ítøkiligari meting. Talan kann t.d. vera um støður, har heilt serlig landafrøðilig ella onnur atlit til ferðing gera seg galdandi, og umstøðurnar í málinum annars tala fyri at víkja frá meginregluni um, at foreldrini deila útreiðslurnar. Tað kann soleiðis út frá eini heildarmeting av ymiskum viðurskiftum vera mett eyðsæð órímiligt, at annar av foreldrunum skal halda ein part av ferðingini, áðrenn vikið kann verða frá meginregluni. Um Familjufyrisitingin metir, at grundarlag er fyri at víkja frá meginregluni um felags ábyrgd, skal Familjufyrisitingin áseta, hvussu ferðingin skal skipast, og hvussu útreiðslurnar skulu deilast.

**Til § 30 – arbeiðsavtalur við loyvi**

Ásetingin samsvarar við § 19 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásett er, at hevur eitt barn, við loyvi frá tí, ið hevur foreldramyndugleika, átikið sær eitt arbeiði, eina tænastu, ella annað persónligt arbeiði, íroknað, har viðkomandi fær møguleika at uppihalda sær sjálvum, kann viðkomandi, ið er fyltur 15 ár, strika avtaluna og átaka sær arbeiðið av líknandi slagi, uttan so, at tann, ið hevur foreldamyndugleika tekur aðra avgerð.

Arbeiðið skal ikki vera kropsligt, men talan kann eisini vera um bókligt arbeiði. Talan er tó einans um arbeiði, har tann ungi kann uppihalda sær sjálvum. Frítíðararbeiðið, so sum at vera fløskudrongur ella -genta, vaskifólk ella boðberi, er ikki fevnt av ásetingini.

Arbeiðsavtalan er gildug og er undir somu reglum sum arbeiðsavtalur hjá myndugum persónum, eisini tá talan er um ábyrgd fyri ikki at lúka treytirnar í avtaluni. Ein ómyndugur kann ikki gera avtalu um ábyrgdarbót. Um kappingartreytir er tað vanliga fatanin, at ein

ómyndugur als ikki kann gera slíkar avtalur í sambandi við arbeiði. Ásetingin gevur tí unga atgongd til at gera avtalu um smálutir í arbeiðsavtaluni, so sum eisini lønaráseting.

Um tann ungi, hóast forboð frá foreldrunum, ger eina avtalu um arbeiði, og sáttmálaparturin er í góðari trúgv, verður tað gjørt av sambært reglunum um fulltrú í avtalulógini, um rættargerðin verður bindandi.

**Til § 31 – arbeiðsavtalur av sínum eintingum**

Ásetingin samsvarar við § 20 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásett er at ein avtala um arbeiði, sum eitt barn av sínum eintingum hevur átikið sær, kann verða strikað av tí, ið hevur foreldramyndugleikan, um atlit at uppaling og vælferð tala fyri tí. Hetta skal tó gerast við hóskandi varningi, og um tað verður mett rímiligt, kann hin parturin fáa endurgjald.

Ásetingin hevur helst bara praktiskan týdning, um talan er um arbeiðsavtalur yvir longri tíð.

Víðvíkjandi endurgjaldi kann arbeiðsgevarin t.d. hava rætt til endurgjald fyri útreiðslurnar fyri neyðuga lýsing eftir nýggjum starvsfólki.

**Til § 32 – fyribils avgerðir**

*Stk. 1 og 2.*
Talan er um eina samanskriving av § 21 og § 23 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Sambært galdandi rætti kann rætturin eftir áheitan taka fyribils avgerð um foreldramyndugleika, og Familjufyrisitingin kann taka fyribils avgerð um foreldramyndugleika í sambandi við andlát. Í øðrum málum er tað rætturin, ið kann viðgera málið.

Sambært ásetingini í uppskoti fær tann myndugleiki, sum viðgerð eitt mál um foreldramyndugleika og samveru heimild til eftir áheitan at gera av, hvør fyribils skal hava foreldramyndugleikan, ella hvar barnið fyribils skal búgva.

Tað er sostatt antin Familjufyrisitingin ella rætturin, sum tekur avgerð, alt eftir hvar málið er til viðgerðar, tá ið áheitanin verður latin inn.

Ein fyribils avgerð skal takast skjótast til ber og skal altíð takast við atliti at barnsins besta.

Mál um foreldramyndugleika fevna um mál um uppathald av felags foreldramyndugleika sbrt. § 11, um flyting av foreldramyndugleika sbrt. § 13, og foreldramyndugleika eftir andlát sbrt. § 15 og um broytingarmál sbrt. § 14, stk. 2. Mál um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 fevna eisini um spurningin um, at barnið kann búgva uttanlands.

Fyrilit skal takast fyri, at talan er um eina fyribils avgerð, og at hon verður fylgd upp við einari endaligari avgerð. Hvat er best fyri barnið skal tí síggjast í einum styttri høpi. Myndugleikin skal vanliga vera afturhaldandi við at taka avgerðir um, at foreldramyndugleikin fyribils skal latast øðrum av foreldrunum, meðan eitt mál verður viðgjørt, fyri ikki at gera seg inn á endaligu avgerðina um foreldramyndugleikan. Hetta er

eisini galdandi í málum, har myndugleikin kann velja í millum at taka eina fyribils avgerð um foreldramyndugleika og eina fyribils avgerð um bústaðin hjá barninum. Í hesum førum hevur ein ein avgerð um bústaðin hjá barninum fyrimun.

Í summum førum kann tó vera neyðugt við einari fyribils avgerð um foreldramyndugleika, t.d. um ósemjan millum foreldur, sum hava felags foreldramyndugleika, viðførir, at barnið ikki fær neyðuga viðgerð. Talan kann eisini vera um støður, tá ið tann, sum hevur foreldramyndugleikan einsamallur, ynskir at flyta við barninum innanlands ella uttanlands. Ein fyribils avgerð um foreldramyndugleika kann eisini vera viðkomandi, tá ið foreldrini hava felags foreldramyndugleika, og annað av foreldrunum er flutt á kreppumiðstøð saman við barninum, orsakað av harðskapi í familjuni, og harðskapurin er skjalprógvaður við melding til løgregluna. Ein fyribils avgerð um foreldramyndugleika kann í hesum málum vera við til at tryggja, at hin ikki fær barnið útflýggja frá dagstovni, skúlum o.ø.

Við eini fyribils avgerð um bústaðin hjá barninum kann dentur m.a. leggjast á tilknýtið millum barnið og foreldrini, persónligu eginleikarnar hjá foreldrunum, og hvussu barnið fer at reagera um tað møguliga skal flyta stovn ella skúla. Tað kann sostatt hava týdning at varðveita verandi støðu fyri barnið meðan málið verður viðgjørt.

*Stk. 3.* Ásett verður, at ein avgerð sbrt. stk. 1 er galdandi, til ein endalig avtala ella avgerð, sum kann fullgerast, fyriliggur.

*Stk. 4.* Ásett verður, at ein fyribils avgerð um foreldramyndugleika og bústaðin hjá barninum dettur burtur, um áheitanin um, at ein avgerð verður tikin um foreldramyndugleika ella bústaðin hjá barninum, verður tikin aftur ella avvíst, ella um foreldrini taka uppaftur samlívið.

Mótsett § 12 fevnir hetta bæði um gift og ógift, sum taka upp aftur samlívið.

**Til § 33 – vandi fyri burturflyting**

Ásetingin samsvarar viðð § 22 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Landsstýrismaðurin, Familjufyrisitingin ella tann, sum verður **heimilaður** til tað, kann eftir umbøn fyribils lata einum av foreldrunum foreldamyndugleikan einsamallum, um foreldrini hava felags foreldramyndugleika, og tað er vandi fyri, at hin fer at taka barnið við sær av landinum undan einari avgerð um foreldramyndugleika. Danmark og Grønland skulu í hesum sambandi metast sum útland.

Talan skal vera um mál, har fráferð hjá barninum er nær við. Avgerðin skal altíð vera grundað á eina ítøkiliga meting av, hvat er best fyri barnið.

Tað er ein treyt fyri at nýta heimildina, at vandin fyri, at barnið verður tikið av landinum, er ítøkiligur og bráðfeingis. Talan kann t.d. vera um, at annað av foreldrunum er horvið saman við barninum, og at ábending er um, at viðkomandi ætlar sær at ferðast av landinum við barninum. Ein løgreglufrágreiðing kann eisini vera grundarlagi undir avgerðini. Av tí at slík mál hava skund at viðgera, kann tað við atliti at barnsins besta gerast neyðugt at taka avgerð uttan partshoyring, sambært § 18 í fyrisitingarlógini.

Viðmerkjast skal, at hóast talan er um ólógliga burturflyting, eru ongar reglur í Føroyum um at fáa barnið útflýggjað.

Evroparáðssáttmálin frá 1980, Haagersáttmálin frá 1980 um borgararættarligu viknaðirnar av altjóða barnaburturflyting og Haagerbarnaverndarsáttmálin eru ikki galdandi fyri Føroyar.

*Stk. 2.* Ásett verður, at ein fyribils avgerð sbrt. stk. 1 er galdandi, til ein endalig avtala ella avgerð um foreldramyndugleika, sum kann fullgerast, fyriliggur, sbrt. tó stk. 3.

Er málið lagt fyri rættin, og rætturin hevur felt dóm um foreldramyndugleika, fellur ein fyribils avgerð um eina foreldramyndugleika sbrt. § 31, stk. 1 burtur, tá ið fullgerarfreistin fyri dómin er farin, uttan so, at dómurin er skotin inn fyri hægri rætt áðrenn. Fullgerarfreistin er 14 dagar eftir, at dómur er sagdur, uttan so, at annað er ásett í dóminum, sbrt. § 537, stk. 1 í rættargangslógini.

*Stk. 3.* Ásett verður, nær ein fyribils avgerð, har annað av foreldrunum fær foreldramyndugleikan einsamalt, fellur burtur.

Um ein fyribils avgerð um einaforeldramyndugleika sbrt. § 31, stk. 1 fellur burtur, sbrt. § 31, stk. 3, fáa foreldrini aftur felags foreldramyndugleika, um foreldrini høvdu tað, áðrenn fyribils avgerðin varð tikin.

Treytin um, at ein áheitan um eina avgerð um foreldramyndugleika skal vera latin Familjufyrisitingini innan 4 vikur, verður eisini mett at vera lokin, um eitt mál um foreldramyndugleika var til viðgerðar á Familjufyrisitingini ella í rættinum, tá ið avgerð varð tikin.

Treytin um, at Familjufyrisitingin innan 4 vikur skal hava fingið eina áheitan um eina avgerð um foreldramyndugleika, er eisini lokin, um eitt foreldramyndugleikamál var til viðgerðar á Familjufyrisitingini ella í rættinum.

Í § 31, stk. 3, nr. 1 er ásett, at ein fyribils avgerð, har annar av foreldrunum fær foreldramyndugleikan einsamallur, dettur burtur 4 vikur eftir, at avgerðin er tikin, uttan so, at áheitan um avgerð um foreldramyndugleika longu er latin Familjufyrisitingini. Hendan treytin er eisini lokin, um eitt foreldramyndugleikamál var til viðgerðar tá avgerð varð tikin.

Í § 31, stk. 3, nr. 3 er ásett, at um foreldrini taka upp aftur samlívið, dettur ein fyribils avgerð, har annar av foreldrunum fær foreldramyndugleikan einsamallur, burtur. Hetta er galdandi fyri bæði gift og ógift foreldur.

**Til § 34 – forðing**

Ásetingin samsvarar við § 24 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Familjufyrisitingin kann gera av, hvør skal hava foreldramyndugleikan, so leingi ein forðing elvir til, at tey, sum hava foreldramyndugleikan, ikki kunnu taka avgerð um persónlig viðurskifti hjá barninum.

Tað er ein fortreyt, at tann, sum hevur foreldramyndugleikan er, forðaður at útinna sínar skyldur og rættindi sbrt. § 3. Hetta kann t.d. vera galdandi, um viðkomandi, orsakað av sálarligari ella likamligari sjúku, ikki er førur fyri at taka støðu til spurningar viðvíkjandi viðurskiftum hjá barninum.

Vanliga ber til at fáa samband við tann, sum hevur foreldramyndugleikan, hóast viðkomandi er uttanlands í óavmarkaða tíð. At viðkomandi er uttanlands kann tí bara metast at vera ein forðing, um nágreiniliga uppihaldsstaðið er ókent, ella tað av øðrum orsøkum ikki er gjørligt at fáa samband við viðkomandi.

Sum dømi um langtíðar ella varandi forðing kunnu nevnast støður, har foreldramyndugleikahavin, orsakað av t.d. varandi sjúku, ikki er før/ur fyri at taka støðu til spurningar viðvíkjandi viðurskiftum hjá barninum. Sjálvt sera stuttar forðingar kunnu eisini gerast grundarlag fyri avgerð, um tað er bráðfeingis tørvur á at taka eina avgerð viðvíkjandi barninum.

Sjálvt um tann, sum hevur foreldramyndugleikan, er forðaður, skal ein ítøkilig meting gerast í hvørjum einstøkum føri. Tá henda meting verður gjørd, verður atlit tikið at, í hvønn mun tørvurin á at tilluta einum foreldramyndugleikan fyribils, er ítøkligur og átrokandi, eins og dentur verður lagdur á, hvussu drúgv forðingin verður mett at vara. Tað er tískil ikki altíð eitt krav at tilluta einum foreldramyndugleikan fyribils.

Ein avgerð um fyribils foreldramyndugleika er galdandi so leingi, sum forðingin er til staðar (ella til barnið ikki longur er undir foreldramyndugleika hjá viðkomandi).

Familjufyrisitingin hevur ikki heimild at áseta treytir um tíðaravmarking í avgerðum um foreldramyndugleika. Familjufyrisitingin hevur heldur ikki heimild at áseta treytir fyri fyribils foreldramyndugleika ella á annan hátt gera inntriv ella avmarkingar viðvíkjandi hesum.

**Til § 35 – samvera**

*Stk. 1.* Ásetingin gevur Familjufyrisitingini heimild til, eftir áheitan, at gera av, hvør fyribils skal hava foreldramyndugleikan yvir barninum, ella hvar barnið fyribils skal búgva.

Avgerðin skal takast skjótast gjørligt, ella í seinasta lagi 4 vikur eftir, at umbønin er móttikin.

Avgerðin skal altíð takast við atliti at barnsins besta. Í sambandi við viðgerðina av málinum, skal Familjufyrisitingin leggja serligan dent á, at avgerðin skal tryggja trivnaðin hjá barninum, og tryggja barnið í móti harðskapi ella øðrum, ið kann skaða barnið, sum t.d., at barnið er vitni til harðskap.

Barnið skal til eina og hvørja tíð takast við upp á ráð í eini avgerð, og barni skal hoyrast alt eftir, hvussu gamalt tað er, ella hvussu búgvið barnið er. Eisini skal Familjufyrisitingin leggja upp fyri, um eitt av foreldrunum er dømt fyri grovan harðskap.

Ein fyribils avgerð um foreldramyndugleika kann vera neyðug, um ósemjan millum bæði foreldrini førir við sær, at barnið ikki fær røttu likamligu ella sálarligu viðgerðina.

Ein fyribils avgerð kann eisini koma upp á tal í málum, har tað eina av foreldrunum er flutt á eina kreppumiðstøð við barninum, orsakað av væl grundaðum harðskapi, sum t.d. er meldaður til løgregluna ella barnaverndartænastuna. Ein fyribils avgerð um foreldramyndugleika kann í hesum førum forða fyri, at barnið verður tikið úr kreppumiðstøðini og útflýggjað hinum av foreldrunum.

Dentur skal vera lagdur á tilknýtið til foreldrini, persónligu eginleikarnar hjá foreldrunum, og hvussu barnið møguliga reagerar upp á at skifta skúla, stovn e.l. vegna flyting. Tað er ein fyrimunur, um so lítið, sum gjørligt, verður broytt í tilveru barnsins.

*Stk. 2.* Ásetingin ásetir, at ein fyribils avgerð er galdandi, inntil ein endalig avgerð um samveru er tikin, ella ein avtala um annað samband fyriliggur.

*Stk. 3.* Ásett verður, at ein avgerð eftir stk.1 fellur burtur, um umbønin um, at tað skal takast ein avgerð um foreldramyndugleika ella samveru, verður tikin aftur ella avvíst, ella um foreldrini koma saman aftur.

**Til § 36 – broyting**

Ásetingin samsvarar við § 26 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru og ásetir, at ein fyribils avgerð sbrt. §§ 30-33 kann broytast, um mett verður, at tað er best fyri barnið. Tað er Familjufyrisitingini, sum kann taka avgerð um at broyta eina fyribils avgerð.

Er málið lagt fyri rættin, tekur rætturin avgerð um foreldramyndugleikan. Eitt mál kann ikki verða lagt fyri rættin, fyrr enn allir kærumøguleikar eru troyttir.

**Til § 37 – ráðgeving og mekling**

Ásetingin samsvarar við § 27 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru, tó soleiðis at ásett verður, at Familjufyrisitingin umframt barnaserkøna ráðgeving eisini hevur skyldu at bjóða mekling. Familjufyrisitingin hevur skyldu at bjóða foreldrum og børnum ráðgeving og mekling, og sum nakað nýtt kann Familjufyrisitingin eisini bjóða øðrum, sum barnið er knýtt at, ráðgeving og mekling.

Ráðgevingin hjá Familjufyrisitingini er fyri øll foreldur í Føroyum, ið ikki liva saman, og børn teirra. Tað er sostatt ikki eitt krav, at foreldrini hava ella hava havt eitt mál í Familjufyrisitingini, ella at tey hava verið í sambandi við Familjufyrisitingina áður.

Royna foreldur at gera avtalu um eina samveruskipan í ráðgevingini, men verða ikki samd, kunnu tey biðja um, at samverumál verður stovnað, tá ið ráðgevingin er liðug.

Familjufyrisitingin kann ikki veita barnaserkøna ráðgeving og viðgera mál um samveru samstundis.
Barnaserkøn ráðgeving kann verða veitt í ymiskum formum, og Familjufyrisitingin gerð sjálv av, í hvørjum formi ráðgeving verður veitt.

***Barnaserkøn ráðgeving til einstaklingar***

Barnaserkøn ráðgeving til foreldur kann hjálpa foreldrum, tá ið trupulleikar, ivamál ella ósemjur eru um viðurskifti viðvíkjandi samveru og/ella foreldramyndugleika.

Endamálið við ráðgeving til foreldur er at hjálpa foreldrum við avbjóðingum viðvíkjandi tí at hava felags barn, uttan at liva saman. Dentur verður lagdur á, at ósemjur verða loystar, og møguligar avtalur verða gjørdar á ein hátt, sum verður mettur bestur fyri barnið. Barnaserkøni ráðgevin savnar seg um støðuna hjá børnum og kann bera fram barnanna sjónarmið.

Ráðgevingin kann fevna um nógv ymiskt, alt eftir, hvat ítøkiligu foreldrini hava tørv á. Tað kann til dømis vera, at tørvur er á hjálp til at semjast um eina ítøkiliga avtalu um eina samveruskipan. Tørvur kann vera á hjálp og ráðgeving til at betra um foreldrasamstarvið, ella hvussu samskiftið kann betrast. Ella tørvur kann vera á at tosa um atburðin hjá barninum í sambandi við familjustøðuna, samveru ella annað, at fáa ráðgeving um, hvussu tey kunnu hjálpa barninum, og hvat er best fyri barnið.

Barnaserkøn ráðgeving kann hjálpa foreldrum at betra um samstarvið og samskiftið teirra millum, at skilja hvønn annan og barn teirra betur, at lýsa og loysa ósemjur og ivamál út frá sjónarmiðinum hjá barninum,  og at gera ítøkiligar avtalur viðvíkjandi samveruskipan, samstarvi og/ella samskifti

Barnaserkøn ráðgeving verður eisini veitt, um bert tað eina av freoldrunum vil hava ráðgeving. Endamálið verður tó best rokkið, og ráðgevingin ger størstan mun, um bæði foreldur luttaka saman og bæði ynskja og vilja arbeiða móti einum góðum foreldrasamstarvi, sum er barninum at gagna.

Barnaserkøna ráðgevingin er eisini eitt tilboð til børn og ung, hvørs foreldur ikki liva saman.

Í ráðgevingini fær barnið eitt frístað til at tosa við ein vaksnan um sínar tankar, kenslur, trupulleikar og avbjóðingar í sambandi við, at foreldrini ikki liva saman. Ráðgevin kann hjálpa og stuðla barninum ígjøgnum tankarnar og kenslurnar og tosað um, hvussu barnið kann handfara tað, sum fyllir.

Tá ið eitt barn kemur til ráðgeving, er tað barnið, ið gerð av, hvat tosað verður um. Ráðgevingin kann vera ein hjálp hjá barninum, um barnið er upptikið av síni lívsstøðu ella ítøkiligum viðurskiftum í sambandi við at hava foreldur, ið ikki liva saman. Tað er ymiskt, hvussu upptikin børn eru av hesum, tað kann broytast yvir tíð, og tað er ymiskt, um børn hava hug til, ella kunnu hava tørv á, at tosa um støðuna.

Vanliga tosar barnaserkøni ráðgevin við foreldrini fyrst. Foreldrini og barnaserkøni ráðgevin avtala, um barnið skal takast við í samrøðurnar. Ynskja foreldrini ikki barnaserkøna ráðgeving, kann Familjufyrisitingin bjóða ráðgeving til barnið einsamalt.

Fyri at barnið skal hava gleði og gagn av ráðgevingini, skal metast um, um barnið hevur aldur og er búgvið til tess.

Foreldur, ið meta, at barn teirra kundi fingið gagn av at komið til barnaserkøna ráðgeving, kunnu senda Familjufyrisitingini umbøn um hetta.

Ráðgevin hevur tagnarskyldu. Upplýsingar, sum koma fram undir ráðgeving, verða ikki givnar víðari til møguligan málsviðgera í samverumáli ella til aðrar myndugleikar, uttan so, at foreldrini ella barnið ynskja tað, ella um upplýsingarnar koma undir fráboðanarskyldu ráðgevans.

***Mekling***

Í málum, har foreldrini eru ósamd um, hvør skal hava foreldramyndugleikan, ella hvussu nógv barnið skal vera hjá hvørjum av foreldrunum, bjóðar Familjufyrisitingin mekling.

Mekling, eisini kallað mediatión, er ein arbeiðsháttur, sum skal hjálpa pørtunum í einari ósemju at samráðast og semjast um eina felags loysn, sum báðir partar kunnu góðtaka.

Grundarlagið undir mekling er, at tað eru partarnir sjálvir, ið rúma bestu loysnina til júst teirra ósemju. Sostatt førir meklarin tilgongdina, men partarnir hava sjálvir ábyrgd av úrslitinum.

Mekling er altíð sjálvboðin fyri báðar partar og kann verða avbrotin til eina og hvørja tíð, um ein av pørtunum ikki ynskir at halda fram.

Hava foreldrini eitt samverumál undir viðgerð í Familjufyrisitingini, verður viðgerðin av málinum steðgað, til meklingin er liðug.

***Barnaserkøn ráðgeving í bólkum***

Umframt barnaserkøna ráðgeving og mekling, skal Familjufyrisitingini bjóða foreldrum, børnum og øðrum, sum barnið er knýtt at, aðra viðkomandi ráðgeving.

Talan kann t.d. vera um samrøðubólkar, barnabólkar, foreldrasamstarvsskeið o.a.

Samrøðubólkarnir hava til endamáls at geva børnum, hvørs foreldur ikki liva saman, høvi at tosa við onnur børn, sum eru í somu støðu og kunnu hava upplivað nógv av tí sama. Børnini fáa møguleika at seta orð á tankar og kenslur viðvíkjandi skilnaðinum og tilveruni aftan á skilnaðin. Í samrøðubólkinum hoyra børnini søgurnar hjá hvørjum øðrum. Tey verða soleiðis varug við, at onnur børn hava tað eins og tey, skilja betur viðurskiftini í síni egnu familju og føla, at tey ikki eru einsamøll. Tað kann kennast sum ein lætti hjá barninum at tosa um sína støðu. Børnini verða eisini stuðlað, soleiðis at tey verða betur før fyri at handfara svárar støður, avbjóðingar ella viðurskifti, sum fylgja við tí, at foreldrini ikki liva saman.

Øll børn og ung (frá umleið 8 til 18 ár), hvørs foreldur ikki liva saman, kunnu luttaka. Tað er ikki eitt krav, at foreldrini hava verið í sambandi við Familjufyrisitingina ella hava eitt mál í Familjufyrisitingini. Tað er ei heldur av týdningi, um tað er stutt ella long tíð síðan, at foreldrini fóru hvør til sítt.

*Stk. 2.* Ásetingin fevnir um tær støður, har mál um foreldramyndugleika ella annað enn ikki er stovnað á Familjufyrisitingini, men har foreldur ella barnið ynskja ráðgeving. Hvørt Familjufyrisitingin skal bjóða ráðgeving í slíkum førum veldst um eina ítøkiliga meting. Partarnir kunnu ikki krevja at fáa ráðgeving.

*Stk. 3.* Verður tað mett óhóskandi ella óneyðugt at bjóða ráðgeving v.m., kann Familjufyrisitingin lata vera við tí. Ásetingin fevnir t.d. um støður, har Familjufyrisitingin júst hevur bjóðað ráðgeving, ella um áheitanin um ráðgeving snýr seg um smáspurningar í sambandi við útinnan av samveru.

**Til § 38 – málsviðgerarreglur**

*Stk. 1.* Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Ásett verður, at umbønir um avgerðir um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru skulu latast Familjufyrisitingini, sum er rætti myndugleiki at taka avgerð í slíkum málum.

Ásetingin staðfestir meginregluna í lógini um, at tað er Familjufyrisitingin, sum tekur avgerð á fyrsta stigi sambært lógini

*Stk. 2.* Ásett verður, at Familjufyrisitingin skal kalla foreldrini á fund í sambandi við eina umbøn um avgerð. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir um annað samband.

Endamálið við fundinum er at hjálpa foreldrunum at blíva samd. Tí verða foreldrini sum meginregla kallaði á fund saman, uttan so, at serligar umstøður gera seg galdandi, sbrt. stk. 3.

Verður tað mett óhóskandi ella óneyðugt at kalla foreldrini á fund, kann Familjufyrisitingin lata vera við tí. Ásetingin fevnir t.d. um støður, har foreldrini júst hava verið á fundi, ein avgerð júst er tikin, uttan at talan er um munandi broyttar umstøður, ella um umbønin snýr seg um smáspurningar í sambandi við útinnan av samveru.

*Stk. 3.* Ásett verður, at foreldrini hava skyldu at luttaka á fundi, uttan so, at serligar umstøður gera seg galdandi.

Serligar umstøður fevna t.d. um álvarsliga sjúku, ella um annar av foreldrunum hevur framt harðskap móti hinum foreldrinum.

**Til § 39**

Ásetingin samsvarar í stóran mun við § 28 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásetingin er tó broytt soleiðis, at einki aldursmark er fyri, nær barnið skal takast við í málsviðgerðina av málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru. Barnið skal sostatt altíð takast við, og tað er ein rættur og ikki ein skylda hjá barninum at luttaka.

Áskoðan og sjónarmið hjá barninum kunnu verða lýst við at hava eina samrøðu við barnið. Áskoðanin hjá barninum kann eisini koma til sjóndar á annan hátt, eitt nú við einari barnaserkønari kanning, innheintan av upplýsingum frá almennum myndugleikum, umvegis upplýsingar frá foreldrunum el.l.

Atlit skal í hesum sambandi takast at aldrinum á barninum. Ein samrøða er t.d. ikki væl egna til smærri børn. Tá kann vera viðkomandi við einari barnaserkønari kanning, einari váttan frá ansingarstovninum ella øðrum serkønum, sum kenna barnið.

Ásetingin er galdandi fyri Familjufyrisitingina og rættin. Víst verður til § 479 í rættargangslógini um samrøðu v.m. við barnið undir einum rættarmáli um foreldramyndugleika og § 480 um samrøðu við barnið.

*Stk. 2.* Skyldan til at taka barnið við í málsviðgerðina er ikki galdandi, um mett verður, at tað kann verða til ógagns fyri barnið, ella um mett verður, at tað ikki hevur týdning fyri málið.

Hetta kann t.d. skjalprógvast við einum ummæli frá einum løggildum sálarfrøðingi, egnum lækna, ella gongdin í málinum higartil kann benda á hetta, t.d. um ósemjan er høg.

Sálarfrøðingur, sum hevur ábyrgd av teimum kanningum og ummælum, sum Familjufyrisitingin brúkar sum part av grundarlagnum fyri eini avgerð, skal vera løggildur.

Hetta fyri at tryggja rættartrygd hjá borgarum, og serliga tí at ein niðurstøða frá einum løggildum sálarfrøðingi kann verða eftirmett av Psykolognævnet sum óheftum myndugleika.

Tað kann vera óneyðugt at blanda barnið uppí, um foreldrini eru samd um ikki at gera tað, ella um talan er um smáspurningar í sambandi við útinnan av samveru.

**Til § 40 - innitiativrættur**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Fyri betur at tryggja, at sjónarmiðið og hugsanin hjá barninum kemur fram, kann eitt barn, sum er fylt 10 ár, biðja Familjufyrisitingina kalla foreldrini á fund, har foreldrini og barnið kunnu tosa um foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum og samveru.

Barnið verður ikki partur í málum, sum eru fevnd av lógini. Tað eru bara foreldrini, sum eru partar í málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru.

**Til § 41 – barnaserkøn kanning**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og gevur Familjufyrisitingini heimild at seta í verk eina barnserkøna kanning og biðja um ummæli frá serkønum um foreldrini í sambandi við viðgerð av málum um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum og samveru.

Endamálið er at lýsa sjónarmiðið hjá barninum.

Ein barnaserkøn kanning kann t.d. vera viðkomandi í málum, har barnið er í einari útsettari støðu í samverumálum, har ósemjan er høg, og í málum, har annað ella bæði foreldrini hava álvarsamar trupulleikar. Ein barnaserkøn kanning kann eisini vera gagnlig í málum, har skilnaðurin millum barnið og samveruforeldrið hevur verið langur, har tað er uppáhald um harðskap, og í málum, har stórir samstarvstrupulleikar eru millum foreldrini.

Familjufyrisitingin kann eisini biðja um ummæli frá serkønum um foreldrini, har dentur verður lagdur á evnini hjá foreldrunum at taka sær av barninum, uttan at barnið verður drigið inn í málið.

Eitt ummæli frá serkønum um foreldrini er t.d. viðkomandi í málum, har ein av foreldrunum hevur sálarligar trupulleikar ella trupulleikar av misnýtslu av slíkum slag, at viðkomandi ikki kann taka sær av barninum. Ummæli frá serkønum er eisini viðkomandi í málum, har eitt foreldur vísir sonevnda samstarvssjikanu.

Ummælið skal vera frá serkønum, sum hava neyðugan serkunnleika til á nøktandi hátt at lýsa viðurskiftini hjá foreldrunum, t.d. frá einum løggildum sálarfrøðingi, einum sálarsjúkulækna ella øðrum serfrøðingi.

Sálarfrøðingur, sum hevur ábyrgd av teimum kanningum og ummælum, sum Familjufyrisitingin brúkar sum part av grundarlagnum fyri eini avgerð, skal vera løggildur. Hetta fyri at tryggja rættartrygd hjá borgarum, og serliga tí at ein niðurstøða frá einum løggildum sálarfrøðingi kann verða eftirmett av Psykolognævnet sum óheftum myndugleika.

Er málið lagt fyri rættin, kann rætturin á sama hátt biðja um ummæli frá serkønum, sbrt. § 479 í rættargangslógini.

*Stk. 2.* Er ein barnaserkøn kanning sett í verk, ella hevur Familjufyrisitingin biðið um ummæli frá serkønum, verður kanningin ella ummælið sent rættinum, tá hesi eru liðug, soleiðis at kanningin ella ummælið kann vera ein partur av málsviðgerðini í rættinum.

**Til § 42 - váttan**

Ásetingin samsvarar við § 29 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Familjufyrisitingin hevur sambært ásetingini skyldu til at biðja um eina váttan frá tí av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, áðrenn avgerð verður tikin um at flyta foreldramyndugleikan sbrt. § 13, stk. 2, og áðrenn avgerð verður tikin um foreldramyndugleika við andlát sbrt. § 15, stk. 3. Við hesum verður tryggjað, at tann av foreldrunum, sum ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, fær møguleika til at úttala seg og møguleika til at biðja um at fáa foreldramyndugleikan.

Ásetingin um, at lata vera við at biðja um eina váttan, um tað má metast at vera til munandi skaða/ampa fyri barnið ella seinka málinum óneyðuga nógv, skal nýtast við varsemi. At málið verður seinkað óneyðuga nógv kann koma fyri, um tað er trupult at finna viðkomandi av foreldrunum.

**Til § 43 – fíggjarligar upplýsingar**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi. Sambært ásetingini í uppskoti fær Familjufyrisitingin heimild at innheinta upplýsingar frá Taks um fíggjarstøðuna hjá foreldrunum í sambandi við viðgerð av málum um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Tað er sostatt ikki neyðugt at fáa hesar upplýsingar frá foreldrunum.

Familjufyrisitingin kann biðja um at fáa ársuppgerð, ognaruppgerð og aðrar upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri málsviðgerðina.

Familjufyrisitingin kann bara nýta heimildina at biðja um upplýsingarnar, um upplýsingarnar eru neyðugar í sambandi við málsviðgerðina.

**Til § 44 – avvísa mál**

Ásetingin er nýggj í føroyskum høpi og gevur Familjufyrisitingini heimild til at avvísa eina umsókn um at broyta foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum, samveru ella annað samband, um umstøðurnar ikki eru broyttar munandi. Heimildin fevnir harafturímóti ikki um burturvísing av umsóknum um at broyta eina avtalu um flytan av foreldramyndugleika sbrt. § 13, stk. 2, sbrt. § 14, stk. 2, ella eina avgerð um foreldramyndugleika eftir andlát, sbrt. § 15, jf. § 14, stk. 2.

Tað er sum meginregla ein treyt fyri at viðgera eina umsókn um at broyta foreldramyndugleikan ella bústaðin hjá barninum, at talan er um munandi broyttar umstøður. Tað er sostatt ikki grundarlag fyri at halda, at tað er best fyri barnið at broyta foreldramyndugleikan og bústaðin, um umstøðurnar ikki eru broyttar munandi.

Ein avgerð um at burturvísa eina umsókn skal altíð vera til barnsins besta.

Ásetingin er serliga viðkomandi fyri tey mál, har fleiri umsóknir koma støðugt, t.d. í málum, har dómur fyrr er sagdur um foreldramyndugleika ella bústaðin hjá barninum. Av tí at endamálið við ásetingini er at verja barnið móti óneyðugari málsviðgerð hjá einum myndugleika, kann talan vera um føri, har tað eisini má umhugsast at burturvísa eina umsókn um at broyta eina avtalu um foreldramyndugleikan ella bústaðin hjá barninum. Tað kann t.d. vera, um foreldrini fleiri ferðir hava gjørt semju.

Um talan er um munandi broyttar umstøður, og umsóknin tí skal viðgerast, er ein meting av, um umstøðurnar, tá ið umsóknin verður latin inn, eru soleiðis, at ein broyting kann vera best fyri barnið. Í hesum sambandi kann aldurin og menningin hjá barninum og tíðin, sum er liðin, hava týdning.

Um umsøkjari ikki kann vísa á munandi broyttar umstøður, kann ein umsókn um at broyta samveru ella annað samband sum meginregla burturvísast uttan at hoyra hin av foreldrunum. Um ivi er um, hvørt ein broyting er best fyri barnið, kann umsóknin ikki burturvísast.

Av tí at tað sambært ásetingini í uppskoti ikki skal gerast ein djúptøkin meting av barnsins besta, er tað neyðugt, at tað á fyriliggjandi grundarlagi má metast, at tað er best fyri barnið ikki at broyta foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum ella samveru o.a. Ein umsókn um at broyta bústaðin hjá barninum kann sostatt burturvísast, um tað út frá fyriliggjandi upplýsingum má metast, at bæði foreldrini eru eins væl egnaði sum bústaðarforeldur. Metingin av, hvat er best fyri barnið, krevur størri vissu, tá ið talan er um bústaðin hjá barninum í mun til foreldramyndugleikan, av tí at bústaðurin hevur beinleiðis týdning fyri gerandisdagin hjá barninum.

Í málum, har ásetingin í uppskoti er viðkomandi, kann Familjufyrisitingin bjóða foreldrunum viðkomandi ráðgeving.

Avgerðin hjá Familjufyrisitingin um at burturvísa eini umsókn um at broyta foreldramyndugleikan, bústaðin hjá barninum, samveru ella annað samband kann kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. Kærunevndin tekur einans støðu til, um burturvísingin hevur verið heimilað, ella um Familjufyrisitingin átti at veruleikaviðgjørt spurningin um foreldramyndugleika, bústaðin hjá barninum, samveru ella annað samband. Metir kærunevndin, at avgerðin hjá Familjufyrisitingini um, at burturvísing ikki er røtt, verður málið afturvíst til nýggja viðgerð hjá Familjufyrisitingini.

**Til § 45 – kærur**

Ásetingin samsvarar í stóran mun við § 30, stk. 1 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru og ásetir, at avgerðir hjá Familjufyrisitingini kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, parturin hevur fingið fráboðan um avgerðina.

Sum nakað nýtt kunnu avgerðir, tiknar sambært § 15 um foreldramyndugleika í sambandi við andlát, nú eisini kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

Í summum førum kann Familjufyrisitingin taka mál upp aftur til nýggja viðgerð, um ein kæra verður móttikin. Til dømis um kæran hevur nýggjar viðkomandi upplýsingar.

**Til § 46 – heimildir**

Skotið verður upp at savna tær ásetingar, sum heimila landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um viðgerð av ymiskum málum í einum.

Nr. 1, 3 og 7 samsvara í stóran mun við galdandi § 16, stk. 4 og § 30, stk. 2 og 3.

Sambært nr. 1 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um viðgerð av málum um foreldramyndugleika, so sum fráboðan av avtalum um foreldramyndugleika sbrt. §§ 9 og 13, stk. 1, mannagongd, tá ið avtalur um foreldramyndugleika skulu góðkennast sbrt. § 13, stk. 2, kravdir fundir, umbøn um ummæli frá serkønum sbrt. § 36 o.a.

Nr. 1 fevnir eisini um viðgerð av málum um foreldramyndugleika í sambandi við andlát sbrt. § 15, og at innheinta upplýsingar um, hvørt foreldur hava gjørt eitt sokallað barnatestamenti ella ikki, sbrt. § 16.

Sum nakað nýtt kann landsstýrismaðurin sambært nr. 2 áseta reglur um viðgerð av málum um bústaðin hjá barninum sbrt. § 18 í lógini.

Sambært nr. 3 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um samveru. Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at áseta reglur um innihaldi í einum samveruskjali. Tá ið foreldur umvegis Familjufyrisitingina avtala samveru, ella Familjufyrisitingin tekur avgerð um samveru, verður hetta skjalfest, hvussu samveran verður skipað. Skjalfest verður, nær samveran byrjar og endar, hvar barnið skal heintast ella handast, og møguligar treytir í sambandi við samveruna verða nágreinaðar. Meginreglur um útinnan av samveru, so sum ásetingar um samveru, sum dettur burtur í sambandi við feriu og høgtíðir, kunnu eisini ásetast. Heimild er eisini til at áseta, at eitt samveruforeldur, sambært § 535 í rættargangslógini kann fáa hjálp í fútarættinum, um barnið ikki verður latið til samveru. Somuleiðis kann bústaðarforeldrið fáa hjálp í fútarættinum, um barnið ikki kemur heim eftir samveru.

Sambært nr. 4 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um viðgerð av málum um annað samband sbrt. § 23 í lógini. Ein serlig støða skal liggja til grund fyri, at Familjufyrisitingin tekur avgerð um annað samband, soleiðis at tað ikki er møguligt at áseta vanligari samveru ella um samveran er serliga avmarkað, t.d. orsakað av arbeiðsstøðuni hjá samveruforeldri. Tað vil siga, at annað samband er t.d. viðkomandi, tá talan er um sjófólk.

Sambært nr. 5 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um viðgerð av málum um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Víst verður til nýggju ásetingina í § 27, har ásett verður, at Familjufyrisitingin kann taka avgerð um ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Foreldrini hava eina felags ábyrgd av at halda ferðaútreiðslur í sambandi við samveru. Heimildin verður nýtt til at áseta nærri reglur um býtið av ferðaútreiðslum í sambandi við samveru, um foreldrini eru ósamd um hetta.

Sambært nr. 6 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um barnaserkøna ráðgeving, barnaserkøna kanning og mekling. Heimildin verður m.a. nýtt til at áseta, hvussu ráðgeving o.a. verður skipað, og hvørja kunning foreldur, barnið og tey, sum barnið er knýtt at, skulu hava í sambandi við tilboðið um ráðgeving o.a.

Sambært nr. 7 kann landsstýrismaðurin áseta reglur um viðgerð av kærum. Heimildin verður m.a. nýtt til at áseta, nær Familjufyrisitingin kann taka mál upp aftur til nýggja viðgerð, tá ið

ein kæra verður móttikin. Til dømis um kæran hevur nýggjar viðkomandi upplýsingar, um kæran inniheldur eina umbøn, sum Familjufyrisitingin ikki fyrr hevur tikið støðu til, ella um feilir eru í málsviðgerðini, sum kunnu hava týdning fyri avgerðina.

**Til § 47 – altjóða sáttmálar**

Ásetingin samsvarar í stóran mun við § 31 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásetingin snýr seg um møguleikan fyri at gera altjóða sáttmálar um viðurskiftini millum føroyskar og fremmandar rættarreglur..

Ásetingin er broytt soleiðis, at tað ikki longur er ríkisstjórnin, men landsstýrismaðurin, sum kann gera altjóða sáttmálar við onnur lond. Málsøkið persóns-, familju og arvarættur varð yvirtikið í 2018, og tá fingu føroyskir myndugleikar lóggávaldið og útinnandi valdið á økinum.

Hetta merkir m.a., at føroyskir myndugleikar fingu heimild at samráðast við fremmand ríki og millumtjóðafelagsskapir og gera altjóðarættarligar sáttmálar við tey, heruppií fyrisitingarligar sáttmálar, ið til fulnar viðvíkja yvirtiknum málsøkjum, sbrt. lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera.

Ásetingin er eisini broytt soleiðis, at bústaðurin hjá barninum og annað samband er skoytt upp í ásetingina.

*Stk. 2.*
Ásetingin samsvarar við § 31, stk. 2 í galdandi lóg um foreldramyndugleika og samveru. Ásetingin er tó broytt soleiðis, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um viðurskiftini millum føroyskar - heldur enn danskar – og aðrar norðurlendskar rættarreglur um foreldramyndugleika og samveru.

Ásetingin er eisini broytt soleiðis, at bústaðurin hjá barninum og annað samband er skoytt upp í ásetingina.

**Til § 48 - gildiskoma**

Gildiskomuáseting. Ásett verður, at løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru kemur í gildi 1. januar 2022, soleiðis at rúm tíð er hjá Familjufyrisitingini at skipa seg sambært lógini í uppskoti.

*Stk. 2.*
Skotið verður upp, at § 7, stk. 2, sum snýr seg um felags foreldramyndugleika, um foreldrini hava ella hava havt felags bústað sambært landsfólkayvirlitinum seinastu 10 mánaðirnar, áðrenn barnið varð føtt, bara er galdandi fyri børn, sum verða fødd samstundis ella eftir, at lógin er sett í gildi.

*Stk. 3.*
Skotið verður upp, at mál, ið eru byrjað áðrenn gildiskomu lógarinnar, verða viðgjørt sambært higartil galdandi reglum.

Almannamálaráðið, dagfesting.

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: